# STÓRATJØRN

EIN BURÐARDYGGUR
BÝARPARTUR

## Heildarætlan

Dagfest: 01.09.2023

Býarskipanardeildin
TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## LESIVEGLEIÐING

Bóklingurin er bygdur upp á tann hátt, at verkætlanin verður lýst í stigvísum støddarlopum frá størri heild til smærri lutir í verkætlanini.



Fyrst verður verkætlanin lýst við teimum yvirskipaðu evnunum, sum eru stýrandi fyri verkætlanina, so sum náttúru-umstøður og økisfortreytir

↓



Síðani verður greitt frá skipanini av býlingunum, sambondum, og býarskipanarligum viðurskiftum.

↓



Síðani verður greitt frá teimum ymsu bústaðarmøguleikunum í teimum ymsu býlingunum. - Hvussu byggjast kann, og hvat verður viðmælt.

Aftast í bóklinginum eru fylgiskjøl, sum nágreina ymisk hugtøk og evni í heildarætlanini, umframt at ymisk viðurskifti verða lýst nærri.

Góðan lesihug.

Dagfest: 01.09.2023

Býarskipanardeildin

# INNIHALD


Stóratjørn í stuttum . . . . . 2
Hugsjónin handan Stórutjørn . . . . . 4

1

**Heild og fortreytir . . . . . 6**



Økislýsing . . . . . 8
Grønu geirarnir oman í býin . . . . . 8
Byggilendi og náttúrlig uppdeiling . . . . . 8
Heyggjar og hæddir . . . . . 9
Vátlendi og náttúra . . . . . 9
Vetrarbýurin. . . . . 9

2

**Skipan og samanseting . . . . . 10**



Býlingar um Miðstaðin. . . . . 12
Menningarætlan . . . . . 12
Vegakervið . . . . . 12
Gøtukervið . . . . . 13
Vatn og náttúra sum bindilið . . . . . 13
Alt á einum stað . . . . . 14
Miðstaður og býartorg . . . . . 16
Sambond við býin . . . . . 18
Yvirlit yvir gonguleiðir og gøtusambond . . . . . 19
Skipan av býlinginum . . . . . 20
Viðmældur bygnaður. . . . . 24
Bygnaður við størri grundøkjum . . . . . 26

3

**Bústaðir / Búformar . . . . . 28**



Randarhús . . . . . 30
Íbúðir (bygging 1+1,5). . . . . 31
Sethús og grannatún. . . . . 32
Skipan av grannatúnum . . . . . 34
Samansetingarmøguleikar . . . . . 36
Samleiki og arkitekturur . . . . . 38

Stóratjørn í tølum . . . . . 40
Leiðingar . . . . . 42
Málfastar tekningar . . . . . 44
Eftirmæli . . . . . 50
Fylgisskjøl . . . . . 52

# STÓRATJØRN Í STUTTUM

## Heild og fortreytir
### Náttúra og veðurlag stýra sniðgevingini

Nýggi býarparturin við Stórutjørn er øðrvísi enn aðrir býarpartar í kommununi. Her eru náttúruøkir, sum innihalda týdningamiklar vistskipanir og eru livistøð hjá nógvum ymsum fuglasløgum.
Hóast Stóratjørn verður tøtt bygd, verða serlig grøn øki vard, har góðar umstøður eru hjá eitt nú fuglinum, so hann framhaldandi kann reiðrast í økinum.

Býlingarnir verða skipaðir í mun til best skikkaða byggilendið í økinum, sum eru heggjarnir og heiðalendið eystanfyri sjálva Stórutjørn. Sjónaringurin her verður ein hin mest stórsligni í býnum, við útsýni heilt suður á Sandoynna og norður á Skálafjørðin. Býlingarnar verða vardir av grønum vallgarðum, ið skapa lívd fyri útsynningsættini her uppi.

Vátøkini sunnan- og norðanfyri tjørnina Stórutjørn verða lutfalsliga órørd. Hesi økini verða nýtt sum almenn grøn fríøki og eisini sum bindilið og áhugaverð farleið millum Stórutjørn og býin.




## Økisskipan / samanseting
### Býlingar skipaðir kring miðstaðarkjarnan

Býlingarnir við Stórutjørn verða skipað kring miðstaðarkjarnan, sum høvuðsvegurin frá Hoyvík eisini verður knýttur upp í.

Miðstaðarkjarnin er staðið har íbúgvarnir við Stórtjørn hittast og gera síni ørindi. Her eru handlar, kaféir og matstovur, busstøðupláss til býarbussleiðina oman í býin. Her verður eitt lívdargott grønt torg, ið leggur upp til miðsavnan og uppihald.

Býlingarnir verða harafturímóti merktir av friðaligum grannalagsdámi við smærri atkomuvegum, sum hvør í sær hevur umstøður til grannatrivnað og felagsskap av ymsum slag.

Dagstovnar og almennir bygningar vera lagdir beint fyri munnan á hvørjum býlingi so ein so lættliga sum gjørligt kann gera síni ørindi á miðstaðarøkinum, og eitt nú heinta børn á vegnum heim til hús.

Stóratjørn er sostatt ikki bert ein víðkan av ovaru Hoyvík. Stóratjørn skal vera ein sjálvstøðugur býarpartur við nærum øllum hentleikum og innrættingum, sum eini føroyskari familju tørvar.

Hugsast kann, at høvuðsvegurin, sum fer norðurum kann endurskipast í mun til annað møguligt virksemi norðanfyri Stórutjørn, sum t.d. gistingarhús o.a.




## Búformar
### Fjølbroytt bústaðarsløg eftir tørvi

Býlingarnir eru skipaðir við eini fjølbroyttari og fleksiblari samanseting í huga. Hvør býlingur kann sostatt hava vanlig sethús, raðhús, smáhús, býarhús við íbúðum, ein stovnsbygning og eitt miðsavnandi felagsøki við felagshúsi. Felagsskapin í grannalagnum skal ein soleiðis hava møguleika fyri at velja til og frá, eftir persónligum lyndi.

Í útleggingini av hvørjum einstøkum býlingi er møguligt at blanda bústaðar samanseting og tættleika í mun til løtubæran eftirspurning og bústaðarpolitiska hugsjón.
Viðmælt verður, at Stóratjørn verður bygt eins og støðumyndirnar í hesum heildarætlanartilfari vísa, so at best metta býarskipanarliga samansetingin kann røkkast. - Har hvør býlingur skal skiljast sum ein sosialt burðardygg og sjálvirkandi eind, við ymiskum bústaðarstøddum, bústaðarsløgum og ognarleistum, sum skal tryggja at býarparturintilsamans fær eina fjølbroytta samanseting av íbúgvum, tvørtur um aldurstig og inntøkustøði.





# HUGSJÓNIN HANDAN STÓRUTJØRN

Ein av høvuðsavbjóðingunum hjá vaksandi býum í londunum kring okkum er at sameina ferðmiklan fólkavøkstur, samstundis sum neyðugt er at tálma lendisnýtsluni og at taka atlit til náttúruna. Í Tórshavn er hendan avbjóðingin enn meira torgreidd, av tí at hon er merkt av einum tvídrátti ímillum eitt vaksandi fíggjarligt trýst á fólk, ið ynskja at seta føtur undir egið borð, og so eina siðvenju um hvussu vit plaga at búseta okkum.

Sambært spurnarkanning hjá Tórshavnar kommunu, frá apríl 2023, kundu sløk 60% av teimum spurdu allarhelst hugsað sær eitt heim, sum er í trá við siðbundna sethúsabygging í Føroyum, við øllum tí frælsi og teimum hentleikum, sum tað vanliga hevur við sær. - Men tað er samstundis ein sannroynd, at tað gerst alsamt meira dýrt og møtismikið hjá fólki at seta búgv eftir júst hesum siðbundna leisti.

Avbjóðingin gerst tískil:

**Hvussu vit tryggja fólki heimlig bústaðarkor og rúmligar karmar, har fólk støðast, samstundis sum hugsað verður um skynsama lendisnýstlu - bæði við atliti til fermetursprísin og varðveitslu av teirri náttúruni, sum vit leggja okkum uppat.**

Heildarætlanin fyri Stórutjørn tekur ímóti hesum avbjóðingunum í við eini hugsjónin um at skapa ein nýggjan býarpart í Norðara Hoyvíksha-ga, sum skal gerast stavnhaldið (ímyndin) av burðardyggari býarbyg-ging í Tórshavnar kommunu.

Hugsjónarligu grundarsteinarnir í ætlanini eru soljóðandi:

- Í Stórutjørn er felagsskapur millum menniskju og virðing fyri náttúruni, tvey av fremstu grundvirðunum.
- Heildarætlanin fyri Stórutjørn savnar seg bæði um tann stóra samleikagevandi felagsskapin fyri allan býarpartin, og smærri nærfelagsskapirnar í smærri býlingunum.
- Fjølbroytt bústaðartilboð, Blandaði ognarviðurskiftir, stigvís útbygging og bygnaðarlig tiltøk skapa ein býarpart, sum er fyri øll.
- Í blandaðum og tryggum grannaløgum hækkar lívsgóðskan, og sosialu avbjóðinganar gerast færri.
- Heildarætlanin fyri Stórutjørn endurtulkar verandi siðir, tá ið ræður um byggisið, tilfar og lendisnýtslu.
- Bygt verður eftir teimum umstøðum og fortreytum, sum staðbundna náttúran hevur. Heiðalendi og heyggjar mynda byggiøkini, har bygt verður við fyri at skapa lívd og sólargóðar umstøður. Náttúrligu vátlendini verða varðveitt og gagnnýtt sum fríøki.



Huglagsmynd av felagsøkinum í Býlingi 1



# 1 HEILD OG FORTREYTIR

Náttúrliga skapið og lendisdygdirnar í hesum partinum av Norðara Hoyvíkshaganum gerast stýrandi fyri hvussu heildarætlanin kann skipast.

Í hesum kapitli verður greitt frá:

- Hvussu býlingarnir verða skipaðir í mun til best skikkaða byggilendið í økinum, t.d á heggjunum og í heiðalendinum eystanfyri sjálva Stóratjørn.
- Hvussu býlingarnar kunnu fáa lívd fyri útnyrðingsættini her uppi.
- Hví vátøkini sunnan- og norðanfyri tjørnina Stóratjørn eiga at verða lutfalsliga órørd.
- Og hvussu økini kunnu nýtast sum almenn grøn fríøki í heildarætlanini, og eisini sum bindilið og áhugaverð farleið millum Stóratjørn og býin.






## Økislýsing

Heildarætlanin fyri Stórutjørn fevnir um eitt øki, sum tilsamans er 599.100 m² til støddar.

Økið móti norði 59.100 m² verður lagt út til ítróttarvirksemi, har m.a. samtykt er at byggja stórhøll við tilhoyrandi parkeringsøki.

Sunnara økið er 540.000 m², harav 296.000 m² verður lagt út til bústaðabygging og restin eru vátøkir, kirkjugarður og økið, sum er norðanfyri trygdarmarkið í mun til møguliga dálking frá ídnaðarøkinum á Hjalla, har bústaðir ikki kunnu byggjast á.




## Grønu geirarnir oman í býin

Á fólkamunni liggur miðbýurin í Tórshavn “innanfyri ringvegin” Fríðøkið við Hoydal og Svarta Foss liggur ímillum miðbýin og býarpartin Hoyvík.

Fríðøkið við Hoydal og Svartafoss er eitt ómetaliga vakurt økið og hevur eina atdráttarmegi, sum savnar allar havnaborgarar. Eitt vælútbygt gøtukervi frá hesum fríøki, røkkur út til stórt sæð allar býarpartar í Tórshavn, frá fjøru til haga.

Somuleiðis eru grønir geirar, sum røkka frá fríøkinum, niðan í ovaru Hoyvík, oman í Gundadal og eftir fjørðuni eystanfyri, heilt oman á Skansan. Hesir geirar eru einastandandi møguleikar, til at knýta saman býa partar.

Í heildarætlanini fyri Stórutjørn verða geirarnir innlimaðir, sum týdningamiklar og tryggar farleiðir. Farleiðirnar verða innrættaðar við gongugøtum og súkklugøtum.
Farleiðin er eisini lokkandi at brúka hjá havnaborgarum í miðbýnum, sum ynskja at fara ein túr í hagan og vera nærri náttúruni.




## Byggilendi og náttúrlig uppdeiling

Sum lýst er við gulum á myndini høgrumegin, liggur størsta bústaðarøkið á slættanum mitt á økinum við 4 býlingum og einum miðstaðarøki.

Tveir minni býlingar kunnu eisini leggjast móti norðureystri. Annar við stuttari frástøðu til miðstaðarbýlingarnar og hin við sjónligum sambandi til býlingin Inni á Gøtu.
Eftirsum at ein farvegur til hesi økini fyri norðan gerst lutfalsliga kostnaðarmikil í mun til henda vegleiðandi bústaðarúrdráttin, kann hugsast. at økið eisini umframt kundi verið útlagt til gistarhús ella líknandi.

Eitt minni øki nær við stórutjørn, eisini lýst við gulum liti, verður lagt út til at hýsa bygningi, ætlaður almannagagnligum frítíðarvirksemi.
Ein geiri til almannagagnligt virksemi, liggur ígjøgnum stóra bústaðarøkið. Her er hugsa um innrættingar til spæl og tílíkt uttandura virksemi.
Hesin geirin knýtir báðar náttúrugeirarnar móti eystri og vestri saman og møtast á nýggja miðstaðartorginum við Stórutjørn.







## Heyggjar og hæddir

Tríggir heyggjar liggja í eini røð móti eystri og fyri norðan. Heyggjarnir eru rundleiddir og grasvaksnir. Grótklettar daga undan í støðum og í millum heyggjarnar eru smá gil. Tá tú gongur í lendinum framvið heyggjunum og kemur til gilini ella lagdirnar ímillum heyggjarnar, letur seg upp eitt vakurt útsýnið yvir sundalagið og Skálafjørð. Gongur tú á heyggjunum, hevur tú eitt frítt útsýnið nærum allan sjónarringin. Hetta vakra útsýnið skal verða atkomiligt hjá øllum. Innanfyri stiplaðu markeringina, skal tí ikki byggjast, men leggjast ein almenn náttúrugøta.
Tætt við tjørnina liggur ein heyggjur sum hevur stóran týdning fyri umhvørvið við Stórutjørn. Heyggurin er rúmskapandi, gevur lívd og ger útitilhaldið unniligari framvið tjørnini.




## Vátlendi og náttúra

Fyri at verja vátlendi mest møguligt, verður ein ávís frástøða tilskilað millum bygt øki og vátlendi. Í eini víðari menning av heildarætlanini, eigur hetta markið at verða umrøtt við avvarandi myndugleikar.

Vátøkið er partur av týdningamiklari vistskipan ísv. lívfrøðiligt margfeldni, har, og harumframt liggja stórar nøgdir $CO_2$ bundin í vátlendinum.

Vátøkið, og økið við Stórutjørn verður umrøtt í eini árinskanning frá 2008, ið Tórshavnar Kommuna lat gera.

Meira kann lesast um hetta í fylgisskjalinum um náttúru og vistskipanir, LCA, osv.




## Vetrarbýurin

Býir, sum liggja á norðaru hálvkúlu eru serliga útsettir fyri hørðum vetrarveðri. Harðbalna veðurlagið ávirkar býin og hvussu fólk í býnum brúka almennu plássini og rekreativu økini. Vetrarveðrið kann merkjast frá oktobur til mai mánaða, har serliga útsynningsvindurin ger um seg, sum ársmiðal-vindrósan á myndini høgrumegin vísir á.

Viðmælt verður, at skipa bústaðarøkini eftir hesum staðbundnu veðurlagnum, soleiðis at eitt nú raðhús verða staðsett soleiðis í lendið at tey veita lívd fyri hini húsini í grannaløgunum.
Vallgarðar skulu eisini byggjast upp ímóti ættini, sum ein heggjarond, sum fellir inn í kringliggjandi lendið.

Somuleiðis verða flestu býlingarnir og miðstaðurin eisini skipaðir soleiðis, at sólkrókar og lívdarlagdir verða á tilætlaðum støðum har fólk savnast.

Sí annars fylgisskjal um innrætting av uttandura savningarstøðum, parkeringsplássum, gøtum og ljósbúnaði og tilfarsnýtslu á uttandura økjum.



# 2 SKIPAN OG SAMANSETING

Í hesum kapitli verður greitt frá:

- Hvussu býlingarnir verða skipaðir kring miðstaðin,
  ið verður knýttur upp í kervið oman í Hoyvíkina.
- Hvussu høvuðsvegurin forgreinar seg út til býlingarnar við tryggum blindvegum og smogum.
- Um Vallgarðarnar, og raðhúsini verða skipaði sum vindverjur osv.
- Hvussu ætlanin raðfestir frílendisatgongd til øll.
- Um ruskavningarskipanina
- Um tættleika og typologi
- Um ætlaðu byggistigini í heildarætlanini
- Um miðsavnandi torgið



## Býlingar um Miðstaðin

Býlingarnir við Stórutjørn verða skipaðir kring miðstaðarkjarnan, sum høvuðsvegurin frá Hoyvík eisini verður knýttur upp í. StórutjørnSum nýggjur býarpartur kann Stóratjørn mennast við einum býlingi í senn. Fyri at búningartíðarskeiðið skal verða so natúrligt og smidligt sum gjørligt, leggur heildarætlanin upp til at miðstaðurin verður til so hvørt, sum býlingarnir eru liðugt mentir.

Hvør býlingur hevur eitt býarhús við íbúðum og við hølum til útvent virksemi á veghædd, sum venda sær til torgið/miðstaðin.
Íbúðirnar í hesum býarhúsunum hóska væl til teirra, sum gjarna vilja búgva har, nógv lív er rundanum.



*Byggistigini*

## Menningarætlan

Meginreglan í verkætlanini er, at menningin í byggistigum er greið við denti á tryggja kvalitet frá fyrsta degi. Til hetta er býlingurin í sjálvum sær eitt gott amboð til býarskipan. Tað hevur alstóran týdning, at fyrstu byggistigini eru dygdargóð og taka seg væl út og tykjast liðuggjørd. Um bert ein býlingur stendur liðugur, so skal góðskustøði verða á hædd við liðnu ætlanina.

Alt ov ofta er heildarætlanir skipaðar á ein slíkan hátt, at dygdirnar og fulla góðskan í býarplaninum kemur ikki til sjóndar, áður enn allur býarparturin er fult útbygdur. Tá kann bíðitíðin eftir dygdunum ofta tykast long.
Við at gera býlingarnar, sum sjálvstøðugar eindir, sum hvør inniheldur neyðugar hentleikar, innrættingar til felagslív og sum liggja væl í landslagnum, kann ein býlingur standa einsamallur. Nærumhvørvið, tún og felagsøkir hjá íbúgvunum í býlinginum er liðuggjørt og tey hava fría atgongd til náttúru.
Byggibúning skal bert verða gjørd, tá verkætlanin er búgvin og verður liðuggjørd. Hetta fyri at varveita, sum mest av náttúruni órørda, so leingi sum gjørligt.

So hvørt sum býlingarnir leggjast aftrat, tekur miðstaðurin skap og er fullfíggjaður tá allir 4 býlingarnir eru lidnir. Handlar og annað virksemið á torginum verður virkið so hvørt, sum fleiri fólk leggjast aftrat í Stórutjørn.

Lesast kann um bygging í stigum, og varðligu byggibúningina í fylgisskjalinum.


*Dømi har*
*býlingur 1-3 eru bygdir*

## Vegakervið

Meginreglan er, at økið skal skipast við so fáum koyrivegum sum gjørligt. Tað skal greitt tilskilað hvar bilar koyra og sum mest av økinum skal haldast frítt fyri bilaferðslu, so tryggar farleiðir eru til tey gangandi.
Ein høvuðsvegur verður førdur ígjøgnum økið og er íbundin Klingruvegin í tveimum støðum. Frá rundkoyringini er í dag ein frákoyring, sum fórir inn til Stórutjørn. Nýggi koyrivegurin verður eitt framhald av hesi frákoyring og verður íbundin aftur í Klingruvegin niðanfyri kirkjugarðin.






## Gøtukervið

Eitt gøtukervi verður lagt út, sum skal eggja fólki, í øllum aldri, at fara út at ganga ella at súkkla. Gøturnar eru tryggar við góðum belegningi og ljósi.
Eitt gøtusamband er millum allar býlingarnar, so tú lættliga kann fara á vitjan í grannalagnum.
Eitt innanhýsis samband ímillum allar býlingarnar verður gjørt, við einum gøtukervi til súklur og gangandi ferðslu. Samband verður millum innahýsis gøtukervið og gøturnar, sum liggja í grønu geirunum. Haðani er samband til ítróttarøkið norðanfyri og til ovaru Hoyvík og Karlamagnusarbreyt.


*Gøtukervið*

## Vatn og náttúra sum bindilið

Vátlendið kring um tjørnina Stórutjørn, verður varveitt í verandi líki. Verandi smærri vøtn, sum í heildarætlanini liggja í býlingi 1 og 2 verða tillagaði og manngjørd. Nýggj vøtn verða gjørd í býlingi 4 og á miðstaðartorginum. Ein á, rennur ímillum tjarnirnar ella vøtnini og syrgir fyri eini ávísari útskifting av vatni. Regnvatn frá økinum verður savnað í ánni.

Áin og vøtnini liggja í grønum, plantaðum økjum í býlingunum. Grønu økini eru felagsøkir hjá teimum sum búgva í býlinginum. Har eru umstøður til spæl og ymiskt útitilhald hjá børnum og vaksnum. Her er spæliplass, hátún og felagshús (lýst við reyðum liti á myndini) við umstøðum til matgerð. Her kunnu grannaløg njóta góðveðursdagar saman, rulla egg á páskum, sláa tunnu á føstulávint ella bara stytta sær stundir og fáa eitt prát.

Framvið ánni liggur býlingsgøtan. Um tú fylgir gøtuni, verður tú nátturliga leiddur víðari til næsta býling burtur frá allari vegaferðslu. Hetta skal virka til, at býlinginarnir ikki kennast ov avbyrgdir frá hvørjum øðrum, og at fólk skulu kunna knýta sambond tvørtur um býlingarnar.


*Vatn og náttúra*

# Alt á einum stað

**Stutt til handils og tænastur í miðstaðnum**
Ein av høvuðstáttunum í býarksipanini av Stórutjørn er, at her hevur tú allar neyðugar hentleikar á einum stað. Frástøðan er stutt frá heiminum til handils, til dagstovn, til lækna v.m. Góðar gøtur gera tað ómakasleysari og nógv skjótari at ganga ella taka súkluna, enn tað er at taka bilin. Tað merkir eisini, at tað verða færri bilar og fleiri fólk at síggja á gøtunum. Í miðstaðnum eru handlar, lækni apotek, hárfríðkanarstova osfr. við vørum og tænastum sum tær tørvar í dagligdegnum.

**Stutt til býarbuss**
Tað er stutt frástøða frá tínum bústaði til miðstaðartorgið, har handlar eru og har tú kanst taka bussin oman í býin. Tað tekur í miðal 1-2 minuttir at ganga, frá tínum bústaði til bussteðgiplássið á torginum. Longsti teinurin at ganga frá bústaði til torgið tekur 5 min.

**Dagstovnur og býlingshús í grannalagum**
Allir býlingar hava eitt grønt felagsøki. Her rennur áin ígjøgnum og verður til eina tjørn. Her er býlingshús, vaktsrarhús, verkstaður, spælipláss og felagstorg til útitilhald. Felagsøkið er karmur um alt slag av grannalags lívið. So sum felagsmáltíðir, tunnusláing, føðingardagshald, yogavenjingar, sjavskappingar, súkkluumvæling og mangt annað.

**Dagstovnur á grannalagsgáttini**
Allir býlingar hava ein stovn. Stovnurin liggur fyrst fyri, soleiðis at til- og frá koyring við bili, órógvar minst møguligt í grannalagnum. Stovnurin kann hýsa dagstovnum og bústovnum av ymsum slagi. Tað skal bera til at hava ansing av tínum børnum í grannalagnum og at verða búgvandi í tínum vanta umhvørvið, tá tú eldist og ikki longur kanst búgva einsamøll ella einsamallur.




Kort, sum vísir gonguteinarnar frá bussstøðuplássi út til ytsta bústaðin í hvørjum býlingi



# Miðstaður og býartorg

Torgið í miðstaðnum, verður ein savnandi kraftmiðdepil í Stórutjørn. Torgið er eitt alment torg, sum allir borgarar hava atgongd til. Men, tað er sjálvsagt eisini ein natúrligur savningarstaður hjá øllum, sum búgva í teimum 6 býlingunum í Stórutjørn.
Serstaka grøna torgið er við til at skapa ein samleika fyri býarpartin við Stórutjørn. Hesin sami grøni samleikin sæst eisini aftur í øllum býlingunum.

Á torginum steðgar bussurin, torgið liggur so mikið sentralt, at teir 4 býlingarnir, sum liggja runt um torgið, hava nøktandi frástøðu til eitt felags bussteðgipláss á torginum. Á sjálvum torginum er ongin bilaferðsla.

Her er pláss til at savna nógv fólk. Til jóla verður jólatræið tendrað á torginum og um summarið ber til at seta búðir upp og hava marknaðardagar

Torgið skal verða virkið, um veturin eins og um summarið. Um summarið er marknaðartorg og útitilhald um vatnhylin, har fólk kunnu sita og njóta ein ís í sólini. Um veturin verður ísbelegningur lagdur á torgið og vatnhylurin er frystur til. Tá ber til at sita og hugna sær við heitum koppi av kakao, meðan børnini skoyta.
Í bygningunum runt um torgið eru kaféir, handlar, borgarahús og aðrar innrættingar sum samvirka við lívinum á torginum.








**Grønt Torg**
Torgið er stórt og er ætlanin, at torgið skal hava ein landslagsdám, heldur enn ein býardám. Grønu geirarnir báðumegin bústaðar- og miðstaðarøkið, føra grønar rásir inn í miðstaðin og geva torginum ein landslagsdám. Grønu geirarnir hava eisini gøtur til súkklur og gangandi, hesar verða førdar ígjøgnum torgið og skipaðar, so henda ferðslan ikki darvar ta gangandi ferðsluna.

Við at draga landslagið inn á torgið og gjøgnum torgið, verða skapt smærri økir á torginum til uppihald við trøum og runnum, samstundis sum hetta er við til at skapa lívd á staðnum. Við at hava vøkstur á torginum, sum hevur beinleiðis atgongd til størru grønu kílarnar, økir man um hugin hjá fólkinum at fara ein túr út í opna landslagið og tað er eisini umvent soleiðis, at man økir eisini hugin hjá tí, sum ferðast gjøgnum grønu økini at fara ein túr forbí á torginum.




**Bygningar**
Í bygningunum kring um torgið verða hølir á veghædd, sum hýsa kaféum, matstovum, handlum og øðrum vinnurekandi, sum fáa viðskiftafólk frá gøtuni, so hárfríðkanarfólk, fótterapeutar osfr.
4 av bygningunum eru íbúðarbygningar sum hoyra til hvør sín býling. Á ovaru hæddunum er innrætta til íbúðir og eru hesar íbúðir væl egnaðar til yngru og eldru ættarliðini. Hesi hava oftast eitt meiri útatvent lív og gera sannlíkt brúk av tilboðunum á torginum og fáa gleði av lívinum og virkseminum har. Ein miðstaðarbygningur, sum hoyrir til miðstaðin hevur stórst rúmvídd og kann hava ymsikt virksemi, sum er til felagsgagn fyri allan býarpartin ella býin. Eitt nú kunnu hølir á veghædd verða kaféir og matstovur við útiservering, antin sum privat ella felagsvirksemi, handilshølir kunnu liggja aftari í bygninginum við atkomu frá torginum, meðan kaféir o.t. liggja við framsíðu móti torginum. Ovaru hæddirnar kunnu hýsa hølum til bústaðarfeløg, borgarahús, bókasavn o.t.




**Ferðsla**
Koyrivegir: Høvuðsvegur, sum knýtur saman allar 6 býlingarnar í Stórutjørn, fer ígjøgnum miðstaðin. Torgið verður tí býtt í tveir partar, í vestur og eystur. Torgið móti eystri, sum hevur besta sólargangin og tí er best egnað til útitilhald, hevur størsta vídd og verður hildið frítt fyri bilferðslu.
Parkeringsøkið til torgið liggur aftanfyri miðstaðarbygningin og undir honum er eisini parkeringskjallari. Skundparkering 1/2-1 tíma verður framvið høvuðsvegnum.

**Savningarstøð**
Meðan tilhaldsøkini í ymsu býlingunum hoyra til teir íbúgvarnar, sum búgva í einstøku býlingunum, so er torgið innrættað við savningarstøðum, sum øll í Stórutjørn og í býnum annars, hoyra til og hava fulla atgongd til. Her á torginum savnast øll tá jólatræið verður tendrað.

Í uppskotinum er eitt torg og ein vatnhylur við innrættingum kring um, til ymiskt útitilhald. Torg og hylur eiga at verða sniðgivin, sum ein heild so tey samvirka. Um summarið kann torgið hýsa ymsum sølumarknaðum ella framsýningum. Um veturin kann torg og hylur verða ein skoytubreyt.

Busskýlið kann innrættast, so tað kann hýsa ymsum virksemi. Um veturin kann har vera útleigan av skoytum ella søla ísv jólamarknað. Um summari kann skýlið vera eitt tilhaldsstað hjá ungdómi og øðrum, sum hava tørv á at kroka undan regni ella fáa lívd fyri vindinum.

Frammanfyri bygningarnar, sum venda móti útsynningi og góðum sólargangi, skal torgið leggjast við belegningi, sum er egnað til innrætta til útiservering.



## Sambond við býin

Stóratjørn verður ein integreraður partur av býnum. Lætt er t.d. at koma til arbeiðis á Landssjúkrahúsið, Setrið ella Glasir.
Tað styrkir um burðadygdina, um møguligt er at ganga ella súkkla tvørtur um býin. Tí er umráðandi er at styrkja grønu geirðanar gjøgnum býin.

Ein súkklutúrur frá torginum við Stórutjørn oman á Háls tekur t.d. bert 6 min., um skundgøta verður gjørd oman gjøgnum grøna geiran í Djúpagili.







## Yvirlit yvir gonguleiðir og gøtusambond

Gøtusambandið, sum verður kring Stórutjørn skal knýtast uppí verkætlanina.
'Ringurin', sum Tórshavnar kommuna skipar fyri. Hetta er sera umráðandi, tí at Stóratjørn liggur so ovarlaga í haganum og tískil er sera gott at fáa samband við restina av gøtukervinum, sum er í býnum. Við at víðka um ringin, knýtast fleiri økir uppí farleiðina, sum gevur fólki enn fleiri møguleikar at ganga, renna og súkkla sær ein túr kring býin.






## Skipan av býlinginum

Umframt at býlingarnir við Stórutjørn hava tað til felags, at teir savna seg um miðstaðin, hava teir eisini eina bygna og eina býlingsskipan, sum líkist frá býlingi til býling.

Býlingur 1, 2 og 4 hava so at siga somu skipan, har sethúsabygging við blandaðum grundøkjastøddum veðurvard av randarhúsum, ætlandi kemur at mynda dámin.

Býlingur 3 verður ein býlingur, har dentur verður lagdur á smá grannaløg av raðhúsum og íbúðarhúsum, har bygningarnir eisini skapa lívd fyri hvør øðrum.

í býlingur 5a, 5b og 6 verður viðmælt, at denturin skal leggjast á íbúðarbygging fram við fallandi lendinum, har góður møguleiki er at byggja hægri, og har har útsýnið norður/eystureftir kann njótast til fulnar.

Her verður eisini skotið upp, at ein partur av lendium, kann avsetast til gistingarhús ella líknandi.




### Býlingur 1, sum umboðandi dømi

Um dømi býlingur 1 verður tikin, sum umboðandi dømi, sæst, at grundleggjandi konseptið fyri býlingarnar við Stórutjørn, verður fasthildið av trimum megintættum:

1. Uttara rondin, við vallgarði, randarhúsabygging og tekjum, hevur til endamáls at skapa trygg og góð rúm til búseting i tí harðbalna landslagnum.
   Vallgarðarnir lofta sostatt ringasta útsynninginum og veita innanfyriliggjandi býlinginum lívd.
2. Býlingshúsið, sum leggur seg uppat Miðstaðarøkinum í Stórutjørn, verður eitt savnandi stað í býlinginum við møguleikum fyri at hava café ella dansiklubba, og einum uppihaldsøki, sum hevur beinleiðis sambandi við Miðstaðartorgið í Stórutjørn
3. Í grøna náttúruøkinum í strekkinum til býlingshjartað liggur býlingsplássið við felagshúsinum.
   Hetta er fyrst og fremst eitt fríøki fyri íbugvarnar í býlinginium, men upplagt er eisini, at økið kann nýtast av stovninum, ið hoyrir til býlingin.

Hetta uppskotið er at rokna sum eitt boð upp á tættleika og býti av funktiónum, og innan hesar karmar kann býlingurin mennast, alt eftir um eftirspurningurin er eftir sethúsum ella øðrum bústaðarformum, sum leggja upp til tættari bygging.






### Býlingur við viðmældum bústaðarsløgum

Fyri at tryggja eina blandaða samanseting av íbúgvum, inniheldur býlingurin ymiskar bústaðartýpur og ognarleistir. Tað verður seg, sjálvbygd sethús, randarhús/raðhús og leigubústaðir og fjølbýlishús.

Harafturat er eisini ein stovnur, felagshús eins og møguleikar til vinnu/almenna tænastu í veghæddini í bygninginum ímóti miðstaðarøkinum.

Í tí vísta býlingum eru 88 bústaðir, sum er viðmældi tættleikin fyri Býling 1.

Í útleggingini av hvørjum einstøkum býlingi er sjálvandi møguligt at blanda bústaðar samanseting og tættleika í mun til løtubæran eftirspurning og í mun til bústaðarpolitiska hugsjón.



### Infrakervi - hørð og bleyt ferðsla

Ferðslan millum húsini í býlinginum, verður ikki ein klassiskur vegur, men heldur sum tún, við smáum plássum, sum eru ætlað til lága ferð (20 km/t), soleiðis at pláss eisini veður fyri rulluskoytum og at lakka paradís.

Tey prikkutu økini á diagramminum er smogur, tún og grøn rekreativ økir, sum bert eru ætlað fólki til gongu og spæli.



### Ferðsla og parkering

Býlingurin hevur eina inn og útkoyring, men møguleiki er eisini at koyra út við býlingshúsið.

Høvuðsparkeringin verður savnað aftan fyri vallgarðin, í ein útsynning undir eini grønari tekju. Við sethúsini er parkeringin samlað pr. 3 hús. Afturat hesum, verður gestaparkering við komuplássið og møguleiki fyri at koyra til allar bústaðirnar, við vøru og í sambandi við viðlíkahaldstænastu, eld o.s.fr.

Roknað verður við tveimum parkeringsplássum til hvørt raðhús og hálvum øðrum til hvørja íbúð. Í tí vísta býlinginum verða uml. 170 parkeringspláss.



**Renovatión**
Tað verður arbeitt við einari loysn til renovatiónina, sum minkar um arbeiðið at savna ruskið inn. Í hvørjum býlingi liggur við innkoyringina ein ruskstøð, til rusksortering. Harafturat er møguleiki at gera súgviskipan til rusk, við ruskstøðum, sum standa lokalt ymsastaðni í býlingunum.



**Vatn**
Við útgangsstøði í landslagsleistinum í verkætlanini, verður miðað eftir, at áarløkir og tjarnir verða verandi órørd í landslagnum. Har sum áarløkir raka byggingina, rennur vatnið sjónliga í natúrligum lægdum og opnum veitum. Har, sum tað ber til, verður grannagøtan løgd, so at hon fylgir natúrligum áarløkum, so at vatnið leiðir vitjandi gjøgnum býlingin. Omanávatn og vatn av tekjum verður, alt tað ber til, leitt gjøgnum hetta kervið, so at vatnið ikki verður tikið úr økinum, men framvegis verður partur av landslagnum og tí serliga, váta náttúruslagnum.



**Grannagøtur og fótgangarar**
Øll útirúm í býlingunum verða sniðgivin til spæl og uppihald, fólki til gongu og á súkklu. Ein grannagøta bindir allar býlingarnar saman og til ber at ganga og súkkla trygt í øllum býarpartinum. Gøturnar binda saman býlingarnar og landslagið. Gøturnar hava eisini samband til Hoyvíkina annars og gomlu hagagøturnar. Gøturnar krossa altíð býlingstúnið og á hendan hátt er lætt hjá børnum at finna og koma runt um og í millum býlingarnar.





**Felagsskapur og friður (og frælsi til at velja)**
Ein av grundhugsjónunum í býarskipanini av Stórutjørn byggir á felagsskapin. Felagsskapin í tí stóra og tí smáa.

Felagsskapur í tí smáa við tey sum tú býrt tætt saman við, í grannalagnum ella býlinginumg og felagsskapur í tí stóra millum tey sum tú býrt í Stórutjørn saman við.
Felagsskapin skalt tú hava møguleika fyri at velja til og frá eftir tørvi. Eins týdningamikið er tað, at tú hevur umstøður til at verða í einingi, bæði inni í- og uttanfyri heimið.

Býlingurin er skipaður við ymsikum bústaðarstøddum, bústaðarsløgum og ognarleistum, sum ger at tú fær fjølbroytni í samansetingina av íbúgvum og soleiðis tryggjar at býlingurin verða sosialt burðardyggur, sum samstundis er útgangsstøði í felagsskapinum.

Í býlingunum eru bústaðirnir og millumrúmini millum bústaðirnar skipaði soleiðis at ríkir møguleikar eru fyri at hitta grannarnar, tilvildarligt ella skipað og ymiskir hættir eru til at ríka felagsskapin. Atkoman til bústaðin er altíð ígjøgnum eitt felagsøki og víðari til eitt felagstún. Tað merkir ikki at tú altíð mást verða saman við øðrum áðrenn tú kemur til tín sjálvs. Men, at tú altíð hevur eina kenslu av at hoyra til ein størri felagsskap, at felagsskapurin er nærverandi og er eitt sosialt tilfeingi, sum tú kanst gera brúk av, eftir tørvi.



Sniðømi um felagshús í býlinginum

ÚTI OG HEIMA

Almenna rúmið

Privata rúmið



| Landslagið ella Miðstaðurin | Felagsøkið í býlingi | Grannalag | Heima |
|---|---|---|---|
| (Tann stóri felagsskapurin) | (Býlingsfelagsskapurin) | (Grannafelagsskapurin) | (privat) |

## Viðmældur bygnaður

Nýggi býarparturin við Stórutjørn verður heilt serligur, tí her er talan um býarbygging við landslagsdámi.
Íbúgvar við Stórutjørn búgva tætt upp at fríu og órørdu náttúrini og inni í býlinginum liggja bústaðirnir við mannaskaptari náttúru, heilt inn til - og ímillum bústaðirnar.

Tá bygt verður í náttúruni, sum her, ræður um at skipa býlingarnar sum tætta bygging, so bústaðirnir taka minst møguligt av lendinum, og hóast náttúran fær góða rúmd, verður rúm fyri umleið 870 bústaðareindum. Um vit taka støði í eini demografiskari kanning, sum er gjørd av býarpartinum í Hoyvík, har kanningin vísur, at nýggjastu býlingarnir í Hoyvík, hava eina miðal húskistødd uppá 2,5 - 4 fólk, kunnu vit rokna við einum fólkatali uppá 2.100 - 3.400 í Stórutjørn.

**BYLINGUR 1**
~ 88 bústaðir
~ 240 til 360 íbúgvar



Við viðmældu býlingsskipanini, svarar íbúgvatalið til fólkatalið í Hósvík, sum er ein sjálvstøðug bygd, men við størri spjaðing av sethúsum.




## Grannatúnini í býlinginum

Viðmælda sethúsabyggingin er uppbygt við 'Grannatúnum', sum er tríggir matriklar við felagsparkering. Hvørt grannatún ræður yvir einum yvirdekkaðum parkeringsplássi og einum vanligum. Hetta liggur í framhaldi av felags renovatiónini og felags atkomu til grannatúnið. Hetta felags atkomustaðið gevur býlinginum samanhang og ein minni skala, sum vendur sær móti vegnum.

Hvørt Grannatún, hevur eina felags atkomu, har tað kann parkerast og eisini gerast eitt trygt spæliøki, tá bilarnir ikki upptaka økið.

Teir tríggir matriklarnir eru ávíkavist 200, 240 og 260 fermetur, har tað í uppskotinum er loyvt at byggja 120, 140 og 160 fermetur í 1,5 hædd, 2 hæddum og 2,5 hæddum.

Meira er at lesa um grannatúnini í næsta kapitli.

Lendisskurður av Býlingi 1





## Bygnaður við størri grundøkjum

Hóast viðmælt verður at býlingurin verður samansettur av áður nevndu grannatúnum við smærri grundøkjum á t.d. 200, 240 og 260 fermetur, er sjálvsagt møguleiki við at skipa sethúsabyggingina eftir meira síðbundnum leisti, við eitt nú grundstykkum á 300 fermetrar og við parkering á egnum stykki, eins og myndin til høgru vísir.

Í hesi skipanini av økinum er dentur lagdur á, at bilhús ella skúrur, skal byggjast aftast á hvørjum einstøkum grundøki so at grannalagi ikki fær ein dám av garasjuhurðum og óruddi. Somuleiðis er dentur lagdur á, at sethúsini standa forskotin í mun til hvørt annað eftir vegnum. Hetta er við til at skapa eitt fjølbroytt og lívdargot umhvørvi húsanna millum, og at skapa ein grønan dám við urtagarðum út ímóti vegnum.



**BYLINGUR 1**
~ 83 BÚSTAÐIR
~207 til 332 ÍBÚGVAR

Við hesi skipan í Býlingi 1, rúmast umleið 83 bústaðareindir, og roknast kann við, at 207-332 fólk koma at búgva her. Hetta svarar til ein sethúsatættleika sum í Gortrugøtu/Bertugøta/Sivjugøta í Hoyvík.

Sigast skal at vansin við hesi skipanini er, at bústaðareindirnar í sær sjálvum gerast dýrari og færri.

GORTRUGØTA
GRUNDØKIR Á 300 m²



## Býlingsskipan av Býlingi 1 við sethúsagrundøkjum á 300m²



# 3 BÚSTAÐIR / BÚFORMAR

Ein av høvuðstættunum í heildarætlanini fyri Stórutjørn er, at lagt verður upp til eina sera fjølbroytta samanseting av bústaðartýpum, støddum og ognarleistum. Bústaðar-ymiskleiki er grundarlagið undir einum sosialt burðardyggum býarumhvørvi, sum m.a. gevur fólki í ymsum aldri, við ymsum rúmligum tørvi, og við ymiskum inntøkugrundarlagi at búleikast í sama grannalagi.

Stóratjørn verður sostatt ein bústaðardepil fyri øll. Her skulu búgva barnafamiljur, støk, eldri pør í íbúðum, lesandi, fólk sum ynskja at búgva í búfelagsskapum, stovnar og vardir bústaðir.

Eisini kann avgerðarrætturin í økinum, verða í samlaða økinum. Ymisk sløg av eigara- og leigi bústøðum, sum hava ymiskar arkitektoniskar 'spælireglar'. Hesir verða settir saman soleiðis, at frælsi, samleiki og eigaraskapur verður tryggjaður, samstundis sum at einstaki býlingurin - og Stóratjørn í síni heild – kemur at virka sum ein samanhangandi øki við staðbundnum sermerki.

Í hesum kapitli verður greitt frá:

- Randarðhúsunum, og hvussu hesi kunnu veita lívd við ein funktionellum skapi.
- Íbúðarbygningunum, og hvussu teir kunnu innrættast og staðsetast.
- Sethúsinunum, og hugsjónini við at seta tey saman í grannatúns-eindir.
- Samansetingarmøguleikunum í býlingunum.
- Yvirskipaðu arkitektonisku hugsjónini um sniðs-dygdir og samleika.



Sniðgávudømi um hvussu grannaløgini kunnu savnast um felagshús, varðveitta náttúru og rennandi vatn

## Randarhús

Hvør býlingur verður uppbygdur við eitt 'lívdarbelti' móti teimum ættunum, ið geva mest av vindi. Serliga móti útsynningi. Lívdarbeltið ger eina neyva yvirgongd til tey stóru órørdu landslagsrúmini, og innanfyri lívdarveggin, liggur býlingurin við betri lívd, ið gevur møguleika fyri útilívi og spæli.

Hátturin lívdarveggurin verður gjørdur er avgerðandi, og eigur at verða kannaður í mun til 'vind'mótstøðuføri'. Skurðurin gjøgnum lívdarbeltið eigur at verða gjørdur á ein hátt, soleiðis at hesin á bestan hátt brýtur vindin.Skurðurin í lívdargarðinum er uppbygdur av einum valgarði, parkering og bilskýli og randarhúsum. Húsini kunnu variera í hædd og breidd, sum eisini ávirkar samansetingina av íbúgvum inni í húsunum, og eisini ávirkar heildina í samansetingin av randarhúsunum í útsjónd uttan. Útgangsstøðið er tó umleið 130 fermetrar fyri hvørt randarhús.






Vallgarður (eisni nevndur lívdarheyggur) við bilskýli og tann fyrsta raðhúsabyggingin lofta tí ringasta vindinum av suðri og vestri og veita býlinginum aftanfyri lívd.
Avlopsgrót og -mold frá arbeiðinum at leggja teir yvirskipaðu vegirnar kann í byggibúningini brúkast til at gera vallgarðin, sum altíð verður lagdur innan úr býlinginum, so at inntrivið í náttúruna uttanum verður so lítið sum gjørligt.




Prinsippskurður við vallgarði
við innbygdari parkering, ið skapar
lívdargóð øki til spæl og uppihald
báðumegin húsini.





## Íbúðir (bygging 1+1,5)

Við útgangsstøði í burðardygd, verður býlingurin bygdur soleiðis, at fleiri fólk kunnu rúmast, við at byggja tættari og við at deila øki, funktiónir og hentleikar. I eini íbúðarbygging eru færri fermetrar av bjálvaðum útiveggi og tøkum, færri leiðingar og møguleikar at menna tann sjálvstøðuga bústaðin. Eisini kunnu fleiri funktiónir deilast – vaskarí, veitsluhøli, orkuanlegg, veltir í nærumhvørvið, borðtennis, súkkluverkstað v.m.
Í Stórutjørn vil ein partur av tí samlaðu bústaðarmongdini verða íbúðir. Hetta partvís í miðstaðarbygging, í randar- og raðhúsum í býlingunum og partvís býlingar, ið bert hava íbúðir sum býlingur 5 og 6.

Miðstaðarbyggingin ella kvarterhúsini, eru størri karakteristiskir bygningar, ið knýta seg til býlingsvegin og savnandi miðstaðin fyri Stórutjørn. Byggingarnar við íbúðum, sum liggja í býlingunum, verða integreraðar við tann meira intima skalan í býlingunum, teirra kompleksitet og tilfarsval.

Í teknaða døminum fyri byggingina niðanfyri, verður parkering staðsett, har felags atkoma er, har eisini verður møguleiki fyri uppihaldi og møguleiki fyri at samlast. Byggingin hevur smærri íbúðir á umleið 70 fermetur í niðaru hædd og størri íbúðir í tveimum hæddum yvir. Hesar eru umleið 120 fermetur.




Prinsipp skurður gjøgnum bygning við íbúðum.




Møguleiki fyri íbúðum í hvørjari av teimum trimum hæddunum.
(Hetta krevur helst lyftu og meira parkering).






## Sethús og grannatún

Í lívd frá randarhúsunum í býlingi 1, eru sethúsini staðsett. Henda útstykking við sethúsum og randarhúsum, víkir frá øðrum útstykkingum í økinum sunnanfyri, við einum størri tættleika og einum størri kompleksiteti og ymiskleika í struktur. Henda útstykking hevur íblástur frá tættaru býlingunum á Tinganesi, har vegirnir eru millumrúm millum húsini og garðarnar. Vegaprofilið hevur hús og garðar heilt út til býlingsvegin. Húsavegir og gøtur og smærri útirúm, verða javntstillaði við meira ferðslukendu vegirnar. Sum Útið á Tinganesi, so er eingin framsíða og eingin baksíða og øll ferðsla fyrigongur seg við eini róligari ferð, har bilar, súkklur og gangandi, deilast um plássið.

Í hesum býarmynstrinum, liggja hús í ymiskum støddum og ymiskum skapi, men við møn og samanhangandi tilfarsvali og litavali. Í sethúsaøkinum í Býlingi 1, eru húsini skipaði við økjum á 12 grannatúnum, við trimum sethúsum fyri hvørt grannatún. Millum sethúsini í økinum verða gøtur, vegir og smærri pláss, ið føra út til náttúruna og inn móti felagsøkjum.



Til høgru sæst viðmælda skipanin av privatu ognunum við sama grannatún.
Svørtu litirnir eru 'fast innbúgv', og tjúkku reyðu strikurnar eru krøv um staðseting á húsaframsíðu.




Grannatún við sethúsum
í ymsum støddum










## Grannatún

Byggingin er uppbygt við 'Grannatúnum', sum er tríggir matriklar við felagsparkering. Hvørt hús ræður yvir einum yvirdekkaðum parkeringsplássi og einum vanligum. Hetta liggur í framhaldi av felags renovatiónini og felags atkomu til Grannatúnið. Hetta felags atkomustaðið gevur býlinginum samanhang og ein minni skala, sum vendur sær móti vegnum. Felagsparkeringin og renovatiónsøkið verður teknað og gjørt beinanvegin, áðrenn eigarar eru fluttir inn í húsini.

Hvørt Grannatún, hevur eina felags atkomu, har tað kann parkerast og eisini gerast eitt trygt spæliøki, tá bilarnir ikki upptaka økið. Í hesum lítla plássinum, verður ein bonkur og møguliga ein lyktapeli, sum skapa karakter.

Teir tríggir matriklarnir eru ávíkavist 200, 240 og 260 fermetur, har tað í uppskotinum er loyvt at byggja 120, 140 og 160 fermetur í 1,5 hædd, 2 hæddum og 2,5 hæddum. Tær kraftigu reyðu linjirinar á tekningini vísa eina kravda lokaða síðu í mark. Við hesum ásetingum, fáa øll stykkir hava og skilagóðan sólargang.
Tær svørtu linjurnar eru felags atkomu- og parkeringsøki.

'Grannatún' kunnu uppbyggjast á ymiskan hátt og eigur hetta at verða kannað víðari. T.d. kunnu kollektiv og fleiri-ættarliðs-hús, hugsast inn í eitt Grannatún. Eisini eru møguleikar fyri at gera fleiri bústaðir til yngri ella lesandi - ein mini-bý á økinum fyri eitt Grannatún.



## Skipan av grannatúnum

Útsnittið fyri sethúsaøkið, vísir grundøkini á eystaru síðu av vegnum. Á vestaru, sunnaru, og norður síðuni eru somu ásetingar og reglur galdandi, men tilpassaðar soleiðis, at hesi fungera saman í mun til hvønnannan og í mun til sólargang við meira.

Við hesum fimm grannatúnunum, er møguleiki at byggja upp øki, inni í kjarnini á hvørjum býlingi sær, sum eru tilpassaði í mun til plásskrøv og -viðurskifti, til lendi, til áir, gil, løkir, tjarnir, vegir v.m.. Um tørvur er á at gera gøtur millum Grannatúnini, er møguleiki fyri at rykkja hesi frá hvørjum øðrum, soleiðis at sambondini inni í býlinginum og millum býlingarnar, sum koma seinni, verður varðveitt. Í hesum flytingum, kunnu uppstanda smærri pláss/tún og grøn øki. Grannatúnini í Býlingi 1 er staðsett soleiðis, at hesi forskjóta seg í mun til hvønn annan og geva pláss til grøn og varierandi sambond.






Ein av teimum góðu avleiðingunum við at sethúsini hava grannatún og felags atkomu inn á privata grundøkið, er at tað skapar góðar umstøður til grannaprát og ein nær-felagsskap húsanna millum.

Harumframt hevur tað eisini týdning at hesi grannatún og felagsatkomur verða lagsar yvirav hvør aðrari eftir grannagøtuni.
Hetta skapar hugnalig innvik á grannagøtuni, har pláss verður til uppihald, og spæl í grannalagnum.




Dømi um skipan av 8 granna-økjum í Býlingi 1, har grannatúnini og felags-atkomurnar verða lagdar yvirav hvør aðrari.

## Samansetingarmøguleikar

Hóast sethúsaøkið hevur eina skipan av einum lutfalsliga tætt bygdum húsum í mun til verandi útstykkingar í Hoyvík og flest aðrastaðni í Føroym, hevur eitt slíkt sethúsaøki sjálvandi ikki eins stórt nettonýtslustig í mun til t.d. randarhúsbyggingar og íbúðarbyggingar.

Um tað er ynskiligt at hækka nettonýtslustigið fyri økið, ber til at skifta eitt ella fleiri sethúsatyssi (trý sethús um eitt grannatún) út við aðrar bústaðar-/bygningssløg.

Niðanfyri eru ymisk alternativ til sethúsini, har øll hesi halda fast um ein felgs skala, variatión og tættleika í býlinginum og sum bert krevja smávegis tillagingar í mun til parkeringstørv.

### Sethúsatyssi

Her sæst áðurnevnda dømi við trimum sethúsum, við grannatúni, felags atkomu og nøktandi felags parkering.

Sethúsatyssið við teimum trimum privatu grundøkjunum á er tilsamans 33x26 metur = 792m² – aloftast við gøtu/geira á 2 metur til næsta sethúsatyssi.

**Inniheldur:**
**3 bústaðir og 6 parkeringspláss.**



### Búfelagsskapur

Ein bygningur verður teknaður á grannaognina, sum er í tráð við frástøður til grannamark, bruna v.m. Hetta kann verða ein búfelagsskapur til víðkaðu familjuna, ella fleiri familjur, sum ynskja at búgva saman.

**Inniheldur:**
**6 bústaðir og 8 parkeringspláss.**



### Eldrabústaðir

Smærri bústaðir í einari ella tveimum hæddum, tætt við smærri túnum, við egnum smærri havum/hátunum uttanfyri.

**Inniheldur:**
**8 bústaðir og 8 parkeringspláss.**





### Ungdóms- og/ella lestrarbústaðir

Smærri lestraríbúðir við atkomu frá grannatúni.
Svalagongd kann brúkast til atkomu á aðru hædd.

**Inniheldur:**
**18 bústaðir og 8 parkeringspláss**



### Raðhús 1

Á tveimum grannaognum,
verða bygd raðhús við felagsparkering.

**Inniheldur:**
**12 bústaðir við 18 parkeringsplássum**



### Raðhús 2

Raðhús við felags parkering við vegin.

**Inniheldur:**
**5 bústaðir við 8 parkeringsplássum**



### Íbúðir

Minni íbúðir við hava í niðastu hædd og ein størri íbúð í tveimum hæddum omaná.

Ella, íalt 3 íbúðir, við einari íbúð á hvørjari hædd.
Felags parkering og lítil urtagarður.

**Inniheldur:**
**10 bústaðir og 10 parkeringspláss**
**(her má finnast pláss uttanfyri)**



## Samleiki og arkitekturur

Tann neyva avmarkingin av býlingunum móti landslagnum uttanum, skapar ein greiðan og rúmligan bygnað, har ið tann einstaki býlingurin gerst ein samfeld og samleikaskapandi heild.

Roynt verður at draga hesa heildina og henda greiða samleikan fram í arkitekturinum í bygginginі, við at skapa nakrar yvirskipaðar leiðreglur, sum kunnu leiðbeina teir ymsu mennararnar og einstaklingarnar, sum seinni skulu byggja í býlinginum. Heilt yvirskipað skulu leiðreglurnar tryggja, at býlingurin verður upplivaður, sum ein heild. Leiðreglurnar skulu eisini tryggja tað neyðuga fjølbroytnið á tí einstaka matriklinum, ella á tí stóru byggigrundini, so at býlingurin av gøtuni verður upplivaður, sum eitt livandi býarøki og ikki sum fábroytt bygging.

Vit ynskja ymiskleika og lív, men samstundis ynskja vit eina ró og ein javnvág í arkitektonisku heildarmyndina, eitt nú við litum, tilfari, takskapi, tættleika, val av plantuvøkstri o.s.fr., sum tilsamans geva býlinginum ein samleika.

Ferðsluøkir og grøn økir kunnu verða við til at styrkja samleikan á býlingunum. Ein felagsætlan fyri ljósseting, belegningar og planting, er við til at skapa ein samanhang og eina serstaka heildarmynd í teim ymsu býlingunum. Hetta kann til dømis vera ein felags leistur fyri teim ymsu tøkunum yvir bilplássini, sum verða sjónlig í gøtumyndini og geva ein serstakan dám. Til dømis er felagshúsið runt í býlingi 1 og í býlingi 3 eru gøtuljósini gul.

Í eini víðarimenning av heildaætlanini, er umráðandi at gera ein designmanual fyri koyrandi og gangandi ferðslu. Eitt nú, at parkeringsøkir eru savnaði á skilmarkaðum økjum, so at hvørt húsarhald eigur eitt pláss við ella uttan tak yvir.

Felagsøkir, grøn økir, felagshús og spæliøkir verða skipaði, so at eingin ivi er um, at her ráða børn og onnur. Ljós, plantur og álegging á gøtum og plássum geva fólki eina tryggleika mótvegis bilferðslu.



dømi um býlingssmogu við Stórutjørn

Hugsanin er, at tøkini í bústaðarbýlingunum verða gjørd sum saðiltøk ella við halli øðru-megin, og at framsíðutilfarið serliga verður úr træi ella profileraðum metalplátum í hóskandi litum. Tá ið ræður um lit, verður íblástur fingin úr landslagnum uttanum. Tá ið arbeitt verður við eini samanhangandi litpalett, sum sprettur úr landslagnum, verða býlingarnir við Stórutjørn sum samansettar heildir á at líta við einum litspæli, sum endurspeglast í teirri kringliggjandi náttúruni.

Tøk og framsíður verða, har tað er gjørligt, úr tilfari og í litum, sum geva eina róliga heildarmynd. Tøkini á serligum bygningum kunnu vera grøn sum gras ella við flagi, so tey traðka fram og sambandið við náttúruna uttanum verður styrkt.

Tá ið raðhús og bygging í hæddum verða bygd, tryggja skiftandi hæddir, framsíðulitir og tilfar, at byggingin verður brotin sundur í minni partar og fær ein fjølbroyttan dám.



litbrøgd úr økinum við Stóratjørn



dømi um framsíður við Stórutjørn

# STÓRATJØRN Í TØLUM

## STÓRATJØRN YVIRSKIPAÐ

| | |
|---|---|
| Heildarætlanin fevnir um: av øki í Norðara Hoyvíkshaga | 599.000m² |
| Vídd mett skikkað til bústaðarbygging | 296.000 m² |
| Býlingavídd tilsamans: | 170.800m² |
| Raðhús: | 141 |
| Sethús: | 88 |
| Íbúðir: | 657 |
| Samlað tal á búeindum | 868 (88.160 m²) |
| Mett íbúgvatal: | uml. 2.430 |

Harumframt fevnir býarparturin við Stórutjørn um:

| | |
|---|---|
| Felagshús: | 540 m² |
| Handil, løtt vinna, fyritøkur: | 9.940 m² |
| Stovnar: | 3.900 m² |
| Samlað vídd (brutto): | 97.540 m² |
| Nettonýtslustig: | 57% |

## STÓRATJØRN - BYGNINGAR OG BÚSTAÐIR







Viðmæld bústaðarfordeiling við Stórutjørn

Sethús | Randarhús / raðhús | Íbúðarhús | Felagshús | Vinnuvirksemi íbúðir í erva | Stovnur



### BÝLINGUR 4




| | |
|---|---|
| Stødd býlingur | 29.700 m² |
| Raðhús (~130m²) | 32 |
| Sethús (~140m²) | 21 |
| Íbúðir (miðstaðarhús) (~90m²) | 21 |
| Íbúðir (~90m²) | 42 |
| Samlað tal á bústøðum | 116 12.770m² |

Harumframt fevnir býlingurin um:

| | |
|---|---|
| Felagshús | 60 m² |
| Handil /løtt vinna | 420 m² |
| stovnur (røktarheim) | 1.500 m² |
| Samlað vídd (brutto) | 14.750 m² |
| Nettonýtslustig | 50% |

### BÝLINGUR 5a & 5b




| | |
|---|---|
| Stødd býlingur | 22.700m² |
| Raðhús | 0 |
| Sethús | 0 |
| Íbúðir (~90m²) | 188 |
| Samlað tal á bústøðum | 188 16.920 m² |

Harumframt fevnir býlingurin um:

| | |
|---|---|
| Felagshús x 2 | 120 m² |
| Mgl. løtt vinna | 200 m² |
| Stovnur (vøggustova?) | 600 m² |
| Samlað vídd (brutto) | 17.840 m² |
| Nettonýtslustig | 79% |

### BÝLINGUR 6




| | |
|---|---|
| Stødd býlingur | 15.200m² |
| Raðhús | 0 |
| Sethús | 0 |
| Íbúðir (~90m²) | 128 |
| Samlað tal á bústøðum | 128 11.520 m² |

Harumframt fevnir býlingurin um:

| | |
|---|---|
| Felagshús | 60 m² |
| Samlað vídd (brutto) | 11.580m² |
| Nettonýtslustig | 76% |



Sethús | Felagshús | Randarhús / raðhús | Stovnur | Íbúðir | Vinna

### BÝLINGUR 1




| | |
|---|---|
| Stødd býlingur | 29.500 m² |
| Raðhús (~130m²) | 27 |
| Sethús (~140m²) | 37 |
| Íbúðir (~90m²) | 24 |
| Samlað tal á bústøðum | 88 (10.850 m²) |

Harumframt fevnir býlingurin um:

| | |
|---|---|
| Felagshús | 60 m² |
| Handil /løtt vinna | 420 m² |
| stovnur (vøggustova) | 600 m² |
| Samlað vídd (brutto) | 11.930 m² |
| Nettonýtslustig | 40% |

### BÝLINGUR 2




| | |
|---|---|
| Stødd býlingur | 41.200 m² |
| Raðhús (~130m²) | 37 |
| Sethús (~140m²) | 30 |
| Íbúðir (miðstaðarhús) (~90m²) | 20 |
| Íbúðir (~90m²) | 84 |
| Samlað tal á bústøðum | 171 (18.370 m²) |

Harumframt fevnir býlingurin um:

| | |
|---|---|
| Felagshús | 60 m² |
| Handil / løtt vinna / alm. (bókasavn?) | 500 m² |
| Stovnur (barnagarður?) | 600 m² |
| Samlað vídd (brutto) | 19.530 m² |
| Nettonýtslustig | 47% |

### BÝLINGUR 3




| | |
|---|---|
| Stødd býlingur | 32.500m² |
| Raðhús (~130m²) | 45 |
| Sethús (~140m²) | 0 |
| Íbúðir (miðstaðarhús) (~90m²) | 16 |
| Íbúðir (~90m²) | 116 |
| Samlað tal á bústøðum | 177 (17.730m²) |

Harumframt fevnir býlingurin um:

| | |
|---|---|
| Felagshús x 3 | 180 m² |
| Handil / løtt vinna / alm. | 3.400 m² |
| Stovnur | 600 m² |
| Samlað vídd (brutto) | 21.910 m² |
| Nettonýtslustig | 67% |

# LEIÐINGAR

**Regnvatn, yvirflatuvatn, tjarnir**

Ætlanin er at skipa uppsamling av regnvatni og yvirflatuvatni við 3 streingjaðum systemi.

**Skipan 1:** Regnvatn frá bygningum og grundøkjum verður leitt í eina traditionella regnvatnsskipan, sum verður førd í høvuðsleiðingar, sum verða lagdar í aðrari síðuni á høvuðsvegi rundan um alt øki. Síðani verður regnvatni leitt í verandi kommunala høvuðsleiðing, og ein partur má førast oman av økinum longur norði, í verandi áir norðanfyri Hvítanes, og norð ímóti Sandvíkarhjalla.

**Skipan 2:** Regnvatn frá parkeringsøkjum og koyrivegum, verður leitt í serliga skipan, sum somuleiðis verður førd í høvuðsleiðing í høvuðsvegi rundan um alt øki. Tað sum er serligt við hesari skipan, er at tað kann verða neyðugt at hava oljuútskiljara á skipanini áðrenn vatnið verður ført víðari út á sjógv.

**Skipan 3:** Áir og tjarnir. Í økinum verður atlit í stóran mun tikið til áir og tjarnir, og nýggjar áir og tjarnir verða eisini skipaðar. Av tí at áir og tjarnir í einum íbúðarøki seta krøv til vatngósku, so verður yvurflatuvatn til áir og tjarnir í mestan mun skipa sum ein sjálvstøðug skipan.

**Spillvatn**

Høvuðsprinsipp fyri spillvatn í økinum er, at alt spillvatn verður leitt út í høvuðskloakk sum verður løgd í høvuðsveg sum verður gjørdur runt um alt íbúðarøki. Talan verður um felags reinsiverk til øki.

Ein partur av spillvatninum verður leitt víðar í verandi kommunala spillvatnsleiðing í Klingruni. Og ein partur má førast oman av økinum longur norði, omanfyri hvítanes, og norður ímóti sandvíkarhjalla.
Verkætlanin leggur upp til at hagin ímillum ymsu býlingarnar verðu verandi órørdur hagi, og tað viðførir at rørleiðingar kunnu ikki liggja í hesum grønu økjunum.
Partar av økinum í hesum íbúðarøkinum er rættiliga slætt, og er avbjóðandi viðvíkjandi falli á rørleiðingi. Ætlanin er at sleppa undan at brúka pumpubrunnar í økinum.

**EL og Tele.**

**Háspenningur:**
Hetta íbúðarøki á Stórutjørn hevur eina slíka stødd, ta tað við vissu verður neyðugt við fleiri trafostøðum, og hesar verða staðsettar í samráð við arkitektar og SEV. Háspenningskaðal verður lagdur í nýggja høvuðsvegin sum verður gjørdur rundan um hetta nýggja íbúðarøki við Stórutjørn, og kaðal verður harfrá lagdur fram til trafostøðir.
Elfelagið SEV veitir, leggur og íbindur háspenningskaðalar, og ber sín part av kostnaðinum fyri kaðalgrøv

**Lágspenningur:**
Lágspenningskaðalar til elveiting av økinum verða lagdir í felagsgrøv frá trafostøð og fram til kaðalskáp.

Elfelagið SEV skipar og staðsetur sínar leiðingar í økinum, og veitir og uppsetur kaðalskáp, og veitir, leggur og íbindur kaðalar, og ber sín part av kostmaðinum av kaðalgrøv.
Gøtuljós:
Gøtuljósinnlegging verður skipa og planløgd so hon passar til ymsu økini og býlingarnar í verkætlanini. Tað verða ymisk prinsipp fyri gøtuljósum, bæði lágir stólpar framvið gøtum, og høgar og lágar mastrar framvið vegum og øðrum økjum. El-talvur til gøtuljósið verða staðsettar á økinum. Kaðalar til gøtuljósinnleggingina verða lagdir í felags kaðalgrøv í økinum.

**Telefon og fipurdragirør:**
Dragirør til telefon- og ljósleiðarainnleggingar verða løgd í felags kaðalgrøv í økinum.
FT Net skipar og staðsetur dragirørini, og møguligar kaðalbrunnar til sínar leiðingar, og veitir alt tilfar, og gera alt arbeiði í hesum sambandi, og ber sín part av kostnaðinum fyri kaðalgrøv.

**Signalkaðal:**
Neyðug dragirør til signalkaðalar til ymisku teknisku skipanir í økinum verða løgd í felags kaðalgrøv.
Kostnaðurin til kaðalgrøv til signalkaðal verður deild millum ymisku leiðingarnar, og bera tær ymsisku leiðingarnar og avvarandi teknisku skipanir sín part av kostnaðinum.

**Skrellisúgv:**
Í samband við ruskinnsavnan, so er ætlanin at nýta eitt sokallað skrellisúgv.
Hetta er ein ruskinnsavningarskipan har ein ruskstatión verður gjørd fyri t.d ein býling, og so verður ein rørskipan løgd út til bygningar/hús
Í bygningum/húsum verða so skaktir og líknandi har borgara kunnu sleppa av við dagrenovatiónina.



# MÁLFASTAR TEKNINGAR / A3

STØÐUMYND




STØÐUMYND
BÝLINGUR 1
økið til náttúruspæliplass
vallgarður
BÝLINGUR 1
lendisskurður
B1
miðstaðarbygningur
rusk
rusk
lendisskurður
felagshús
rusk
innsavning
býlingspláss
rusk
stovnur
vallgarður
1:500

## LENDISSKURÐAR
## BÝLINGUR 1



1



2



3

1 2 3








**STØÐUMYND MIÐSTAÐUR** 1:500

## LENDISSKURÐUR MIÐSTAÐUR




Skurður - 1:300



# EFTIRMÆLI

Heildarætlanin er gjørd í einum samstarvi millum teknistovurnar SNA - Selmar Nielsen Arkitektar og MAP arkitektar, sum í felag hava havt ábyrgdina av heildarráðgevingini. Í toyminum hava eisini luttikið sum undirráðgevarar: Holscher Nordberg Arkitekter, LBF Ráðgevandi verkfrøðingar, SMJ Ráðgevandi Verkfrøðingar og PB Consult og Spenn

Í 2020 skrivaði Tórshavnar kommuna út eina arkitketakapping um uppskot til ein nýggjan býarpart við Stórutjørn.
Tá tað gjørdis greitt at tvey toymi fingu 1.virðisløn, fingu hesi toymini uppgávuna í felag at gera eina nýggja heildaætlan við útgangsstøði í báðum kappingaruppskotunum.

Eitt fyrireikandi arbeiðið var gjørt við verkstovum saman við fólkum frá býarskipanardeildini, teknisku deildini umhvørvis- og viðlíkahaldsdeildini. Aðrir viðkomandi partar sum vóru boðnir við til verkstovurnar vóru umboð frá Tjóðsavninum sum varðaðu av djórum, fuglum og náttúru. og fólkum frá Umhvørvisstovuni, sum varðaðu av umhvørvinum.

Íalt vóru hildnar 4 verkstovur við byggiharra og interessentum

verkstova 1: ítróttarøki og Stórhøll
Verksotva 2: Innkomuvegur, vega og gøtukervi
Verkstova 3: Náttúra
Verkstova 4: miðstaður, bústaðir og vinna

Á verkstovu 3 um náttúru, var umrøtt at fáa gjørda eina dagførda árinskanning av økinum við -stórutjørn. Mn ttá tað gjørdis greitt at ikki bar til at fáa eina nýggja kanning gjørda í inniverandi ári, metti TK at heildarætlanin fór at missa momentum og at tað tí var neyðugt var at halda fram við verkætlanini og taka tey neyðugu atlitini at vátøkjunum so gott sum til ber.

SNA og MAP hava havt 2 innanhýsis verkstovur. Verkstovurnar vóru hildnar í eini skúlastovu í skitsum við Løgmannabreyt. Báðar dagarnar vóru toymini úti á byggiøkinum við Stórutjørn. Fyrrapartar skrásettu vit á økinum og seinnapartar umrøddu vit ymsu viðurskiftini og gjørdu niðurstøður við skitsum og notum. Síðan hava teknistovurnar arbeitt við heildarætlanini og er hon nú liðug.

Næsta stigið verður at gerða nágreiningar av býlingum og miðstaðið.

SNA, Selmar Nielsen arkitektar og MAP arkitektar

dagf. 20.okt.2022



Útgangsstøði: kapping
(Tað besta frá báðum)

SNA - *OYGGJAR Á HEIÐI*
Oyggjar - greiður skilnaður ml. bygt og óbygt øki
Vallgarður - ítøkilig vindverja



SNA+MAP

(STÓRATJØRN - *EIN BURÐARDYGGUR BÝARPARTUR*)

Atlit til náttúru
Sosialur trivnaður

MAP - *BYGDIN Í BÝNYM*
Miðstaður
Varveita vátøkir og heyggjar
Ringvegur



# FYLGISSKJØL

Fylgisskjølini eru útgreinandi tekstir, sum eru tiknir
beinleiðis úr fyrstu útgávuni av heildarætlanini
fyri Stórutjørn frá 20. januar 2023 hjá MAP og SNA.

# NÁTTÚRA OG VISTSKIPANIR

**COVID-19 og vistskipanir**
Í kjalarvørrinum av COVID-19 er eitt vaksandi uppmerksemið á sambandið millum náttúruoyðileggingar, veðurlagsbroytingar og álvarsligar umfarsóttir.

Ein av niðurstøðunum í eini norðurlendskari granskingarverkætlan, ljóðar soleiðis: *"... Når vi mennesker direkte eller indirekte ødelægger dyrs levesteder, og op mod 70 procent af de naturlige økosystemer er påvirket, så kan de blive tvunget til at søge nye habitater for at overleve og komme tættere på vores husdyr og på mennesker. Det gælder eksempelvis flagermusen, der bærer mange virusser."* **-**

Professor Carsten Rahbek

**Ábyrgdarfull náttúruplanlegging**
Hendan heildarætlanin fyri Stórutjørn umfatar eitt økið sum er umleið 60 hektarar til støddar. Stóratjørn er í dag hagalendi, sum hvørki hevur verið bygt ella velt. Tað órørda og súra jørðildið skapar eitt serligt náttúruslag, sum er eyðkent við lyngha-ga, grasi og vátlendi. Ein serstøk náttúra, sum er viðkvom, og sum tað ikki ber til at endurskapa, tá ið hon einaferð er uppgrivin, velt ella avveitt.

Økið er fjøltáttað við vallaðum fløtum og heyggjum. Sumstaðni daga klettar undan og tjarnir í ymsum støddum liggja við vátlendi kring um seg. At økið er fjøltáttað hevur við sær eitt fjølbroytni í búøkjum og samstundis eisini eitt lívfrøðiligt marg-feldi.

**Árinskanning**
Táverandi Føroya Náttúrugripasavn gjørdi eina árinskanning í 2009 av økinum við Stórutjørn. Kanningin var gjørd í sambandi við eina byggiverkætlan,  sum seinni varð slept.

Árinskanningin frá 2009 staðfestir, at í økinum eru virðismiklar vistskipanir, sum liggja í eitt nú vátlendinum og heiðalendinum

Fuglur
Økið er eisini búøki hjá meira enn 13 ymiskum búfuglum, sum reiðrast her. Fleiri av fuglasløgunum eru á "reyða listanum" yvir hótt fuglasløg.

Lyngur
Somuleiðis verður víst á at heiðalyngur er í stórari afturgongd í Føroyum eins og í øllum Evropa. Lyngi tørvar súra og karga mold og trívist saman við grøsum við sama tørvi.

Plantur
Sambært almennum skrásetingum vaksa 48 ymisk plantusløg í økinum við Stórutjørn, eitt nú mýrifípa, lyngur, kjøtátnar plantur sum undirløgugras og nakrar av teimum norðast vaksandi orkideunum í heiminum sum børkubóndi. Fleiri av fugla- og plantusløgunum í økinum eru á reyðlista og sostatt í afturgongd.

Vátøkir
Vátøkið kring Stórutjørn verður viðmerkt í árinskanningin og víst verður á Ramsar Sáttmálan sum byggir á ta sannføring, at vátlendi bæði hava fíggjarligan, men-tanarligan og vísindaligan týdning umframt virði fyri frítíðarlívið. Eisini verður í sáttmálanum staðfest, at vátlendisfuglar í flestu førum eru flytifuglar.
Hesi seinnu árini er eisini varpað ljós á at vátøkir spæla ein sera stóranleiklut tá tað ræður um at binda niður $CO_2$.

Hóast Føroyar hava tikið undir við Ramsar sáttmálanum, eru til dags dato onki vátøki útnevnt í Føroyum.

Í niðurstøðunum í árinskanningini verður mælt til, at verja lyng og fugl sum eigur í økinum. Í mun til støddina er nógvur fuglur á økinum. og mælt verður til at geva fuglinum frið. Her verður m.a.  hugsað um at tað ikki verður spongt í tíðarskeiði-num har fuglurin reiðrast.

**Náttúru raðfestingar í Stórutjørn**
At heildarætlanin fyri nýggja býarpartin við Stórutjørn, tekur serlig atlit til náttúruna í økinum, er ein týdningamikil liður í at planleggja burðardygt.

Bústaða- og miðstaðabyggingin verður skipað sum tøtt bygging fyri at so stórir partar av náttúruni, sum til ber, kunnu liggja órørdir.

Umráðandi er at hava í huga, at náttúruøkini eru viðbrekin fyri ávirkan frá gravima-skinum og tílíkum ísv.við býarmenningina.
Tá farið verður til verka, má leggjast ein ætlan fyri inntrivini, soleiðis at inntrivini ikki hava álvarsligar fylgir fyri djóra- og fuglalívið í økinum.


mýrufípa


undirløgugras


heiðalyngur


børkubóndi


børkumura og smá silkibond


Stóratjørn

# MANNGJØRD INNTRIV - LANDSLAG

Býlingarnir skilja seg burtur úr landslagnum við greiðum marki millum heimrusti-na og hagan. Hetta er aldargamalt í Føroyum. Bøgarðurin, kirkjugarðurin, ból og aðrar girðingar skilja seg týðiliga burturúr sum mannskaptar oyggjar í náttúruni.
Í Stórutjørn verður mannskaptað byggingin løgd í lendið eftir hesum leistinum. Fyri at varðveita og verja náttúruna í økinum, er markið móti landslagnum týðiligt, meðan bygging og gróðurseting verður hildin inni í felagsskapinum í býlinginum, sum gjørt hevur verið frá gamlari tíð.
Tá ið ræður um snið, verða grót- og vallgarðar nýtulkaðir sum markskapandi táttur í nýggjum líki. Eitt nýmótans amboð, sum kann brúkast í samtíðar býarmenning og skapa ymiskar kantstøður, sum gera sítt til at greina býlingin og sambandið við landslagið og náttúruna sundur.


Kirkjugarður í Koltri


Kirkja í Saksun


Leynar


Koltur

Markið millum hagan og heimrustina



# MANNGJØRD INNTRIV  - BYGNINGAR

Manngjørd inntriv - bygningar
Stóratjørn liggur uppi í hæddunum og veðurlagið er harðført. Men, náttúran er vøkur og útsýnið vakurt frá øllum sý-nishornum. Við hesi staðseting uppi í hæddunum er ikki ráðiligt at staðseta bústaðirnar við stórari frástøðu ímillum. So sum vit síggja í vanligum sethúsaútstykkingum. Vandi er fyri at opnu økini ímillum bústaðirnar verða vindmikil og óunnilig hjá fólki at ferðast í og trupult at fáa gróður í tað gróðursetta

Hyggja vit eftir hvussu vit í Føroyum hava bygt av fyrstan tíð, so síggja vit at hugsað hevur verið um júst hetta at skapa lívd ímillum húsini.

Býlingar sum Á Reyni hevur givið íblástur til býarbyggingina við Stórutjørn.
Her hava fólk búðleikað, handlað, spælt og møtst í túnum og smogum ímillum húsini.   Her eru gøtur, smogur, pláss, portur, urtagarðar, felags økir, náttúra og útsýni í ymsar ættir.
Gøturnar snara seg, rúm lata seg upp og aftur. Har eru smá og hørð pláss og eins nógvir smáir grønir lummar.
Her eru ongar framsíður ella baksíður, men eitt áhaldandi skifti ímillum tað sum er eins egna og tað sum er felags.

Tað er júst ein slíkan bý vit ynskja okkum!


Kantar. Smogur. Litir. Homogenitetur.


Eitt bland av støddum. Útitillhald egið og felags


Grøn millumrúm og útsýnislummar




Lívd, nærheit, tættleiki og felagsskapur í Tinganesi. Javnvágin millum "hørð og bleyt" millumrúm

# FELAGSSKAPUR OG LIVILIGHEIT

Ynski er at Stóratjørn verður eitt gott og lokkandi stað at búgva. Stóratjørn er ein partur av Tórshavn, men er til støddar sum ein bygd tá heildarætlanin er fult útbygd.
Tá búgva á leið 1800 fólk í Stórutjørn. Til samanberingar kunnu nevnast bygdir sum Vestmanna við 1260 fólkum og Fuglafjørður við 1619 fólkum. Báðar bygdirnar hava sín egna sterka samleika. Soleiðis skal Stóratjørn eisini hava sín egna samleika. íbúgvarnir skulu stoltir kunngera "eg komi úr Stórutjørn".
Tá tú býrt í Stórutjørn gerst tú partur av samleikanum á staðnum og ert samstundis partur av felagsskapinum, bæði tí stóra felagsskapinum millum Stórutjarnabúgvar og tí lokala felagsskapinum í tínum egna býlingi og grannalagi.

Býarparturin Stóratjørn verður til í stigum. Fýra av teim íalt seks býlingunum eru skipaðir um ein miðstað. Allir fýra býlingar hava hvør sítt býarhús, tá allir býlingarnir eru bygdir, eru karmarnir um felagstorgið samstundis gjørdir og miðstaðurin er virkin. Her á felagstorginum verður jólatræið tendrað. Her steðgar bussurin, her eru kaféir, handlar, borgarahús, bókasavn og annað sum er til felags gagns fyri allar býarbúgvar har um leiðir.
Býlingarnir í gomlu bygdunum eru okkara fyrimyndir í Stórutjørn. Bygdirnar eru av fyrstan tíð vorðnar til við at hús leggjast aftrat húsum og verða til ein býling. Í bygdunum eru fleiri býlingar, sum við tíðini gerðast beinagrindin í bygdini. Fyrimunurin við býlinginum er umframt lívd og liviligheit, eisini tað tætta sambandið millum húsini sum ger, at tað er lætt at knýta sambond millum húsfólkini.
Tú hoyrir til í býlinginum og kennir teg trygga. Er okkurt áfatt, er hjálpin nær. Tú ert ein partur av felagsskapinum uttan stórvegis hóvasták.
Soleiðis sum býlingarnir eru skipaðir við savnandi felagsøkjum, bústaðarsløgum, ymiskum støddum á bústøðum og eini eggjan til nýhugsan innan ognarviðurskiftir, er grundarlag fyri at skapa ein fjølbroyttan og áhugaverdan býling við sterkari samanhangskraft. Støðið er tá lagt undir ein sterkan býarpartsfelagsskap, ein tættan grannafelagsskap og í summum førum ein heilt tættan búfelagsskap.
Uml. 30 % av øllum húskum í Suðurstreymi eru einlig. Av teimum eru uml.3/4 heilt einsamøll og 1/4 einlig v. børnum. (hagtøl frá 2017)
Fólk sum eru í vandabólkinum, hvat einsemi og fátækraváða viðvíkur, eru júst hesi sum búgva einsamøll, eru stakir uppihaldarir og tey, sum av ymsum orsøkum, ikki eru partar av arbeiðsmarknaðinum.
Granskingar vísa á, at social samvera hevur størri týdning fyri okkara sálarheilsu, enn frísk luft og at røra seg. At sálarheilsan er ein størri faktorur enn kropslig heilsa, tá tað ræður um at liva leingi.
Tað er ikki nóg mikið at vera virkin á sosialu miðlunum ella at vera saman við nógvum fólkum. Men, vit mugu vera partur av einum bólki og hava tættari tilknýti til menniskju, bæði til tey nærmastu og tey sum tú ert saman við í dagligdegnum.


Úti a Reyni


Tjørnuvík


Býlingur í Stórutjørn





## VINDUR OG LÍVD

### Býlingurin sum amboð

Tann yvirskipaði bygnaðurin í verkætlanini skapar býlingar, sum standa í neyvt útvaldari legu í lendinum. Sum mest av órørdum lendi er ímillum. Hesin kendi byggiháttur loyvir tí einstaka býlinginum at fáa mest møguligt burtur úr staðsetingini - eitt nú útsýni, lívd, vatn ella lendi.
Sum aftursvar til rákið við kámum skiftum, sum vit síggja í nógvari býarmenning, eisini í Hoyvík, myndar býlingurin karmin um ein sterkan felagsskap og er ein týðandi liður í at skapa eina ætlan, sum er harðførur móti framtíðini, og sum natúrliga er býtt upp í byggistig, so at møguleiki verður fyri einfaldari og varisligari byggibúgving, sum frá líður.



Vindrósa á Stórutjørn



prinsipp sniðgeving av lívdarheyggi um býling

### Vindrósa við Stórutjørn

Tað er stundum harðført við Stórutjørn. 120-170 metrar oman fyri sjóvarmálan ræður vindurin ofta, og hetta krevur nógv av einum komandi býlingi. Vindrósan vísir greitt, at vindurin serliga liggur av útsynningi.
Býlingssniðið leggur upp fyri teimum ringastu ættunum og gevur fólki, vøkstri og felagsskapi lívd.

Móti útsynningi verður settur vallgarður sum lívd. Móti landnyrðingi verður býlingurin myndaður annaðhvørt av byggingini sjálvari, eini laðing ella beinleiðis av eini sokkulbygging, sum týðiliga og neyvt skilur býlingin burtur úr landslagnum.



Vindsimulering av býlingi

### Tálma vind og skapa lívd

Endamálið við yvirskipaðu sniðgevingini í býlingunum við lívdarheyggum, innanhýsis skipanini av bygningum og takskapinum, er at skapa góð og trygg rúm til bústaðir, í einum harðbaldnum landslagi, 150 metrar uppi í hæddunum.

Sniðgevingin er royndarkoyrd í einum forriti sum vísir hvussu vindur háttar sær. Vindsimuleringarnar vísa at tað er møguligt at skapa útiøkir við lívd ímillum bústaðirnar í býlinginum. Tað góða mikroklimaði tryggjar at íbúgvarnir fáa røttu umstøðurnar til at hava eitt virkið útilív ímillum bústaðirnar. Somuleiðis fáa trø, runnar og annað sum verður gróðursett, røttu umstøðurnar til at grógva. Við tíðini verður mikroklimaði enn betur, so hvørt sum trø og runnar vaksa til.

Lívdarheyggurin sum er markið millum náttúru og býling, er fyrsta verjan ímóti vindinum. Men, lívdarheyggurin kann eisini nýtast sum bygningslutur til ymsar innrættingar í býlinginum. Til dømis kann lívdarheyggurin sniðgevast sum partur av eini parkeringsloysn, goymsluskúri, hjalli ella sum partur av sniðgeving av útitilhaldi.

Í framhaldandi arbeiði við heildarætlanini eigur at vera arbeitt nærri við loysnum innan aerodynamikk og hvussu vit best tálma vindinum til fyrimuns fyri útitilhaldið í Stórutjørn.


lívdarheyggur um bilskýli


Lívdarheyggur við taki / hjallur


lívdarheyggur um útitilhald / park


lívdarheyggur við takúthang


lívdarheyggur, kantursona og bygningur


lívdarheyggur um bygning


bygningar eru vindbremsur i bylingunum á heyggunum móti landnyrðing

## SNIÐGEVING TIL VETRARBÝIR

Býir, sum liggja á norðaru hálvkúlu eru serliga útsettir fyri ekstremum veðrið um veturin. Ekstrema veðrið um veturin ávirkar býin og hvussu borgararnir í býnum brúka almennu plássini og rekreativu økini í býnum um veturin. Veturin er ofta frá oktobur til mai. Granskingin innan evnið vetrarbýir vísir á, at tað er best at sniðgeva býir eftir teirra lokalu avbjóðingum, eitt nú við at man í einum vetrarbýi hevur avbjóðingina við fáum tímum av dagsljósi um veturin, lágum hitastigi, nógvum vindi, regni og kava. Øll hesi viðurskiftini ávirka serliga nógv fólk, sum eru til gongu í býnum og hugin til at ganga um veturin. Kuldi er ikki størsta orsøkin til at man ikki gongur um veturin, men samanrenningin av kulda, regni og vindi og væntandi dagsljósi ger, at fólk ganga minni um veturin. Við at sniðgeva býir eftir veðurlaginum er tað møguligt at gera býir, sum verða brúktir dagliga gjøgnum alt árið. Áðrenn man kann eggja og áleggja býarbúgvum at brúka býin meira aktivt gjøgnum veturin, so er man noyddur at taka nøkur atlit, tá tað kemur til innrætting og sniðgeving av býnum. Gjøgnum granskingina av evninum er funnið fram til nakrar leiðreglur um sniðgeving í vetrar býum. Hesar meginreglur hava verið grundleggjandi galdandi fyri sniðgevingina í heildarætlanini.

**Almenn pláss**
Savningarstøð og sitipláss á almennu plássunum skulu vera staðsett soleiðis at man fær mest møguligt sólarljós á staðið og góða lívd fyri vindinum, soleiðis at plássið kemur til at kennast betri at vera í gjøgnum alt árið, eisini um veturin! Tað er umráðandi at staðið er gott at vera í allar fýra árstíðinar. Skapa áhugavert virksemi á almennu plássunum gjøgnum allar fýra árstíðinar, soleiðis at man tilvitað fær brúkt dygdirnar hjá teim ymsu árstíðunum. Staðset opnur og høvðusinngongdir í bygningunum kring plássini, at hava beinleiðis atgongd til uttandura virksemi í umráðnum fyri at virksemið inni í bygningunum og uttandura virksemið kunnu ávirka hvønn annan.
Viðvíkjandi kavarudding á almennuplássunum er umráðandi at hugsa inn pláss til at hava 'kavarúgvurnar', frá ruddingini av vegnum. Tað vil siga, at man ikki goymir kavarúgvurnar í einum norðurvendum skugga umráði, har sum lítið ella einki dagsljós kemur til, tí so brúka tær longri tíð um at bráðna og upptaka óneyðugt pláss av felagsøkjunum.





**Parkeringspláss**
Ger smærri parkeringspláss, sum eru býtt sundur við plantuvøkstri. Hetta ger tað lættari hjá fólki at finna bilin hjá sær aftur og minkar um vindmegina á staðnum. Eisini skal gerast ein gongubreyt á parkeringsøkinum, soleiðis at vaksin og børn kunnu ferðast trygt á parkeringsøkinum. Gongubreytin skal hava beinleiðis atgongd til høvuðsinngongdina til ymisku bygningarnar.





**Tilfar**
Brúka tilfar, sum taka hita til sín og sum kennast fjálg um veturin, tá tað er kaldari úti. Til dømis træ, plastik og ymisk samansett tilfar halda sær fjálg í longri tíð á árinum enn t.d. metal. Staðset borð og benkur tætt at vetrargrønum runnum og nálatrøum, soleiðis at man fær sitið í lívd í so stóran mun sum møguligt. Heitari litir eru í síni heild áhugaverdari um veturin enn kaldari litir.



**Ljósbúnaður**
Staðset ljós í umráðnum serliga egnað til fólk til gongu og fólk á súkklu, tí kenslan av at kunna ferðast trygt í umráðnum er ein grundleggjandi faktorur fyri nýtsluni av umráðnum. Við at hava góðan ljósbúnað um kvøldarnar og veturin tá sólin er farin í kav, tryggjar man sær at nýtslan, trygdin, hugurin og áhugin fyri at brúka gøtu- og súkklukervið er størri enn um ljósbúnaðurin varð niður raðfestur.



**Gøtur**
Staðset gøturnar við einum so stuttum strekki sum møguligt til endamálið, hetta ger tað hugaligari at brúka gøturnar í ringum veðri. Ljósbúnaður og inventar til fólk til gongu økja um trygdina og vælveruna í økinum. Hugsa um ymisku brúkararnar frá byrjan, t.d. tá tað kemur til allar aldursbólkar, kropsligar førleikar o.a. Hetta skal alt sniðgevast so tað er møguligt hjá øllum brúkarum at hava atgongd til almenn býarúm og grøn økir.





## FRÍLENDI FYRI ØLL

Frílendi fyri øll
Náttúruvakra økið við Stórutjørn verður eitt nýtt upplagt útferðarmál og skal sjálvsagt verða atkomiligt fyri allar havnaborgarar.

Økið skal hava innrættingar sum gera Stórutjørn til eitt spennandi stað at vitja, hjá familjum, einstaklingum, ungum sum eldri.

Tað er sum kunnugt umráðandi fyri fólkaheilsuna at vit hava eitt virkið lív, at vit koma út í náttúruna, fáa friska luft og røra okkum.

Grønu geirarnir frá miðbýnum og niðan á økið við Stórutjørn, verða innrættaðir við almennum gongu- og súkklugøtum. Túrurin eftir geirunum er upplivingarríkur og hevur nøkur steðgistøð á vegnum. Útferðamálið kann til dømis verða ein útferð við modelbáti ella gummibáti at sigla á tjarnum. Fleiri tjarnir eru á rutuni úr býnum og niðan í Stórutjørn og grønu geirarnir eru bindingarlið millum nærum allar tjarnirnar.

Eitt økið tætt við tjørnuna "Stórutjørn"er lagt av til bygning, sum kann hýsa ymsum almennum frítíðarvirksemi. Tað kann verða til skótar og ymsar felagsskapir hvørs virksemi er tengt at náttúruni.

Grønu geirarnir báðumegin bústaðarøkið við Storutjørn, hava eina grøna rás sum knýtur báðar geirarnar saman. Grønu rásirnar frá báðum geirunum savnast á torginum nýggja miðstaðnum. Á rásini eru innrættingar til útitilhald, sum verða meira urbanar, jú tættari tú nærkast torginum í miðstaðnum.



Húsavík - dømi um sigling við gummibátum



Skanderborg Trailcenter - dømi um almannagagnligt anlegg til frítíðarvirksemi






ByNatur HøjeTåstrup - dømi um torn við læring um grøna orku -



Remisen - dømi um innrætting til spæl og kropsrørslur

# GØTUR




## Tórshavn - ringurin

Gøtusambandið, sum verður kring Stórutjørn skal knýtast uppí verkætlanina 'Ringurin', sum Tórshavnar kommuna skipar fyri. Hetta er sera umráðandi, tí at Stóratjørn liggur so ovalaga í haganum og tískil er sera gott at fáa samband við restina av gøtukervinum, sum er í býnum. Við at víðka um ringin so gerst ringurin uppaftur størri, og knýtir fleiri økir uppí farleiðina, sum gevur borgaranum enn fleiri møguleikar at ganga, renna og súkkla sær ein túr kring býin.

## Býlingsgøtur og landslagsgøtur - yvirlit






## Býlingsgøtur og landslagsgøtur - Flokking




Býarleiðin
Ein trygg og skjót farleið millum miðstaðin í Stórutjørn og Karlamagnusarbreyt verður førd frá miðstaðnum, ígjøgnum býling 2 og yvir um ferðslutunga Klingruvegin, við eini brúgv. Børn kunnu trygt súkkla til og frá skúlanum og/ella ítróttarvirkseminum. Eisini er farleiðin góð hjá teimum, sum hava handilsørindi í miðstaðnum ella á Karlamagnusarbreyt. Býarleiðin verður stundum førd eftir býlingsgøtu og stundum førd yvir um koyriveg í býlingi. Tilfarið á býarleiðini er sostatt ymiskt. Tó skal belegningur á brúnni vera úr glíðitryggum tilfari.

Býlingsgøtur
Býlingsgøturnar eru ofta í smærri grønum økjum uppat býlingunum og sumstaðni liggja gøturnar heilt uppat bústøðunum, sum smáar smogur millum tveir bústaðir ella tvey bústaðarøki. Høvuðsfunktiónin á býlingsgøtunum er at gera tað lætt og ámakaleyst at ferðast til gongu ella á súkklu inni í býnum. Hesar gøturnar skulu kunna brúkast árið runt, eisini í tí myrku tíðini, og tí er neyðugt at tær eru upplýstar á ein ella annan hátt. Gøturnar kunnu vera upplýstar av kringliggjandi vegljósið ella við at vera ljóssettar við ljóspullertum framvið gøtunum.
Tilfarðið á hesum gøtum skal vera gott at ganga og súkkla á. Breiddin á gøtunum skal vera gjørd soleiðis, at gøturnar eru góðar hjá fólki at ganga, eisini við barnavogni og øðrum.

Frílendisgøtur
Frílendisgøturnar eru deildar upp í tveir bólkar: høvuðsgøtur og sekunderargøtur. Høvuðsgøtan er ein breið gøta, sum er góð at ferðast eftir. Gøtan skal vera staðsett soleiðis at hon leiðir borgarar úr kringliggjandi bústaðarøkjum og runt í frílendinum. Høvuðsgøtan kann í nógvum førum eisini vera ein partur av einum longri gøtustrekki og verður tí ofta brúkt til at ganga longri túrar á. Høvuðsgøtan skal kunna brúkast árið runt og tí verður arbeitt fram ímóti at hon verður ljóssett við ljóspullertum.
Sekundergøtan er ein smalri gøta, sum leiðir borgararnar longur inn í frílendið at njóta tey ymisku áhugaverdu støðini inni í frílendinum. Hendan gøtan skal ikki taka ov nógv uppmerksemi og skal ikki ljóssetast. Hon skal fella so væl inn í lendi sum møguligt.

Landslagsgøtur
Landslagsgøtur eru gøtur, sum ganga frá býlingunum við Stórutjørn og út í opna landslagið kring bygdað økið. Høvuðsfunktiónin av hesum gøtunum er at geva borgarum í kommununi,og ferðafólki annars, atgongd til at uppliva opna landslagið og geva møguleika fyri at ganga langar túrar úti í náttúruni. Landslagsgøturnar virka eisini sum sambindingarliður millum Stórutjørn, Oman Gil, Inni á Gøtu og Hoyvíkshædd. Tá landslagsgøtur verða gjørdar ella umvaldar er umráðandi at fara hóvliga fram, og taka hædd fyri teimum dygdunum, sum eru í landslagnum og hvussu hesar verða varðveittar. Eisini er umráðandi at dámurin av gøtuni hóskar seg til dámin av landslagnum. Landslagsgøtur verða tí ongantíð ljóssettar og tilfarið, sum verður nýtt, er í stóran mun lokalt tilfar. Er lendið vátt kunnu gøturnar verða gjørdar úr timbri, soleiðis at gøtan kann lyfta seg upp frá lendinum og gera minst møgulig árin á landslagið.

Sundsgøtan
Eisini liggur gamla bygdagøtan til Sund í økinum, sum má metast at vera einlandslagsgøta. Hon skal varðveitast í verandi líki. Tó verður neyðugt við umleggingum av bygdagøtuni, har bygningar í Býlingi 5 verða staðsettir og har bygningar verða staðsettir í "ítróttarøkinum".

# BURÐARDYGG BÝARBYGGING

**Burðardygg planlegging**
Stóratjørn skal í øllum lutum hava burðardygd sum eitt yvirskipað parametur, tá loysnir skulu finnast, og verða fult og heilt á hædd við nútíðar burðardyggar býir. Heildarætlanin hevur eina røð av loysnum, sum allar taka støði í burðardyggari hugsjón.

Náttúra og búseting
Náttúran og lívið í náttúruni er eitt tilfeingi, sum vit ikki longur kunnu taka fyri givið, men sum vit skulu verja um og taka atlit at. Tessvegna eru býlingarnir skipaðir við tættari bústaðabygging, soleiðis at sum minst verður tikið av náttúrulendinum, so atlit kunnu takast at vistskipanini á staðnum.
Náttúran er ein fortreyt tá tú býrt í Stórutjørn. Hetta økir tína virðing fyri náttúruni og skerpar eisni títt tilvit um vistskipanina á staðnum og hvørji atlit mótvegis náttúruni, tú sum íbúgvi mást taka, tá tú býrt her.
Stutta fjarstøðan millum bústað og fría náttúru, ger at tú lætt og skjótt kanst fara út at ganga og fáa fríska luft.

Samvera og tryggleiki
Býlingarnir eru skipaðir við hvør sínum øki til felags tilhald. Hvør býlingur hevur sítt fríøki við einum felagshúsi. Her kunnu tey hittast í dagligdegnum, antin til skipað felags tiltøk ella bara til at stytta sær stundir. Fýra býlingar liggja rundan eitt felagstorg. Hetta torgið verður savningarstaður hjá øllum, sum búgva í Stórutjørn og nærumhvørvinum annars.

Ferðsla
Eitt gøtukervi, sum knýtir saman býlingarnar innanhýsis, og sum eisini knýtir Stórutjørn í verandi býarpartin í Hoyvík, er ein tryggur ferðslugeiri hjá íbúgvunum. Eftir gøtunum kunnu tey ferðast trygt við súkklu ella til gongu í skúla, til frítíðarítriv ella til handils.
Eitt útbygt gøtukervi ger tað lætt hjá íbúgvunum at flyta seg millum støð. At flyta seg til gongu ella við súkklu, er heilsubetri og eisini bíligari enn at flyta seg við bili. Eitt útbygt og gott gøtukervi eggjar fólk til at lata bilin standa.
Koyrivegir og parkering eru skipað soleiðis, at gangandi fólk og spælandi børn, hava fremstu raðfesting.

Lívd og mikroklima
Býlingar, sum eru vendir móti útsynningi, hava allir ein lívdarheygg upp fyri. Heyggurin er mannskaptur og verjir raðhúsini, sum eru uttasta røðin av bústøðum, ímóti vindi.
Raðhúsini skapa lívd fyri bústøðunum innari í býlinginum. Bústaðirnir liggja tætt saman og skapa góða lívd og eitt gott mikroklima ímillum húsini.

Kostnaður
Ein avbjóðing hjá ávísum bólkum í samfelagnum er fíggjarliga orkan til at ogna sær ein bústað. Hendan avbjóðingin er eisini kend aðrastaðni í heiminum, har arbeitt verður við at menna nýggjar hættir at byggja og fíggja. Ein áhugaverdur leistur er "byggifelagsskapir", har talan er um at skipa eina bygging, sum fleiri menna og rinda í felag. Í heildarætlanini fyri Stórutjørn er innbygdur møgulleiki fyri at víðarimenna nýggjar samansetingar av bústøðum, innanfyri karmarnar í heildarætlanini

Í eini víðarimenning av heildarætlanini skulu allar loysnir umrøðast við atliti at burðardygd.

**Burðardygg bygging**
Burðardygg bygging kann deilast í trý høvuðsøkir: tann sosiali, tann fíggjarligi og tann umhvørvisligi parturin. Tann sosiala burðardygdin fevnir um trivnað í og uttanum ein bygning. Hetta merkir millum annað at bygningar verða designaðir við gjøgnumhugsaðum arkitekturi og virkisføri, sum tryggja trivnað. Trivnaður í bygningum verður skaptur við hóskandi ljós- og ljóðviðurskifti, góðum inniklima og hóskandi rammum og hentleikum sum heild. Fíggjarligi parturin av burðardygd fevnir um samlaða kostnaðin av byggiverkætlanini, bæði útreiðslur til tilfar og útbúnað og til rakstur og viðlíkahald av bygninginum ígjøgnum alla livitíðina. Her verður millum annað mett um, um ein møgulig meirútreiðsla í sjálvari byggingini kann hava sparingar við sær í longdini, eitt nú við lægri rakstrarútreiðslum ella minni tørvi á umvæling. Umhvørvislig burðardygd snýr seg um skynsama nýtslu av náttúrutilfeingi og tilfari, og eina burðardygga tilgongd til umhvørvið, við tí fyri eyga, at dálka minst møguligt og í so stóran mun tað er møguligt varðveita náttúruna, hetta bæði ísv. bygging og rakstur.

2. LCA greining
Donsk tøl vísa, at áleið 70% av samlaða útlátinum frá einum bygningi stavar frá byggitilfarinum, herundir framleiðslu, útvinning av rávørum, viðlíkahald, endurvinning/burturbeining o.a. Hetta merkir, at sæð yvir eina livitíð á 50 ár, stavar bert okkurt um 30% av samlaða útlátinum frá rakstri av bygninginum. Hesi tølini vísa á týdningin av at hugsa verður um val av tilfari, tá ið bygt verður. Í Danmark verður frá 1. januar 2023 sett krav um, at øll nýbyggjarí yvir 1000 m2, skulu gera eina greining av útlátinum frá byggitilfarinum, ið verður nýtt til byggjaríið, eins og markvirðið verður sett fyri hvussu nógv ein bygningur í mesta lagi kann útleiða. Markvirðið er givið í kg CO2e/m2/ár.
Samlaða útlátið frá byggitilfari kann finnast í eini LCA greining, ið er ein greining av útlátinum frá einum tilfari ígjøgnum alla tess lívsringrás. Upplýsingar um útlátið frá ávísum tilfari, kunnu finnast í ymiskum databasum. Hesir databasar upplýsa antin generisk (miðal) data fyri eitt slag av tilfari, ella nágreiniliga útlátið frá einum tilfari frá einum ávísum framleiðara (EPD). Samlaða útlátið frá einum bygningi kann finnast við einstøkum LCA greiningum av øllum byggitilfari, ið verður nýtt í bygninginum.
Í hesi verkætlan verða LCA greiningar gjørdar av øllum bygningum, soleiðis at metast kann um útlátið frá byggitilfarinum, ið verður nýtt. Miðað verður eftir, at nýta tilfar, ið hevur minst møguligt útlát, uttan at fari verður uppá kompromis við góðskuni.



Útilív í vátlendinum við Stórutjørn



# VARISLIG BYGGIBÚGVING

Føroysk byggibúgving ber ofta í sær stór inntriv frá byrjan, har ið høvuðsvegir, veitingarvegir o.a. verður lagt, samstundis sum byggiøkir verða sprongd í helluna og planerað. Hetta sást m.a. við Karlamagnusarbreyt og er kent úr øðrum nýmentum býarøkjum, har ið stór inntriv í landslagið ofta liggja og bíða í fleiri ár, stundum áratíggjur, áðrenn gongd kemur á byggingina á teimum síðstu byggistigunum. Hetta elvir til opin sár í landslagnum, sum gera tey nýggju býarøkini minni áhugaverd at búseta seg í og taka náttúru burtur óneyðuga.
Við denti á tað landslagsliga útgangsstøðið og við virðing fyri náttúruni við Stórutjørn arbeiða vit við at leggja lunnar undir eina øðrvísi og meira landslagsliga byggibúgving, sum ikki letur stór planerað byggiøkir liggja í fleiri ár, men tvørturímóti skapar nýggjar og hóvligar landslagstættir, sum sum frá líður gera býlingarnar byggibúnar.
Við Stórutjørn verður tann landslagsliga byggibúgvingin skapt við at arbeiða virkið við avlopstilfarinum frá arbeiðinum at gera høvuðsvegin og veitingarvegirnar, sum fyrst verða gjørdir byggibúnir. Mold og grót frá arbeiðinum at gera undirstøðukervið, verða brúkt til at skapa vallgarðarnar í býlingunum sum eitt einfalt fyrsta inntriv. Vallgarðarnir verða gjørdir innanífrá sum verjugarður út ímóti tí órørda landslagnum. Mold verður løgd út, og trø verða plantað. Tá ið tíðin er búgvin, verður sjálvur býlingurin gjørdur við búseting, stovnum ella vinnu innan fyri vøllgarðin og trøini.



**UNDIRSTØÐUKERVI & VEITINGAR**

Avlopstilfarið frá arbeiðinum at gera høvuðsvegin og veitingarnar til økið verður skilt og brúkt til landslagsliga byggibúgving.



**VALLGARÐUR**

Við avlopsmold verður gjørdur ein vallgarður uttan fyri laðingina til at líva fyri vindi.



**GRÓÐURSETA TÍÐLIGA**

Innan fyri laðingina, har ið arbeiðsvegurin hevur verið, verður tíðliga trægróður gróðursettur í lívandi umstøðum. Gróðursetingarnar kunnu vaksa til, sum bíðað verður eftir, at byggiøkið verður tikið í brúk.



**BÝLINGURIN VERÐUR BYGDUR**

Tá ið tíðin er búgvin, verður sjálvur býlingurin gjørdur við nýggjari bygging í natúrligum samspæli við vallgarðin, tey plantaðu trøini og nýggjar tættir sum til dømis bilskýlið fram við vallgarðinum.

# BÝLINGAR UM MIÐSTAÐIN

Stóratjørn er ikki bert ein víðkan av ovaru Hoyvík. Stóratjørn er ein "rættur" býur, við nærum øllum hentleikum og innrættingum sum skulu til, fyri lívsins uppihald. Tað tekur tó nógv ár at gerðast ein býur, og ímeðan býurin veksur, skal hann virka saman við grannalagnum, og geva íbúgvunum neyðugu samleikakensluna, sum hoyrir býlinginum ella bygdini til.
Fyri at búningartíðarskeiðið skal verða so natúrligt og smidligt sum gjørligt, leggur heildarætlanin upp til, at miðstaðurin verður til so hvørt sum býlingarnir eru liðugt mentir.
Hvør býlingur hevur eitt býarhús við íbúðum og við hølum á veghædd, sum venda sær til torgið/miðstaðin.

Hvør býlingur er ein sjálvirkandi eind sum inniheldur ymiskar bygningseindir, ræðhús, sethús, býarhús við íbúðum, eitt felagsøki við felagshúsi og ein stovnsbygning.
Somuleiðis er ein felagsskipan til ruskinnsavning sum virkar sjálvstøðugt fyri hvønn býling sær. Tá miðstaðurin er fullfíggjaður, verður ein miðsavnan av ruski frá teim 4 býlingunum á miðstaðnum.




# bygging í stigum

Meginreglan í verkætlanini er, at menningin í byggistigum er greið, við denti á at tryggja kvalitet frá fyrsta degi. Til hetta er býlingurin í sjálvum sær eitt gott amboð til býarskipan. Tað hevur alstóran týdning, at fyrstu byggistigini eru dygdargóð og taka seg væl út og tykjast liðuggjørd. Um bert ein býlingur stendur liðugur, so skal góðskustøðið vera á hædd við liðnu ætlanina.
Alt ov ofta eru heildarætlanir skipaðar á ein slíkan hátt, at dygdirnar og fulla góðskan í býarplaninum kemur ikki til sjóndar, áðrenn allur býarparturin er fult útbygdur. Tá kann bíðitíðin eftir dygdunum ofta tykast long.

Við at gera býlingarnar sum sjálvstøðugar eindir, sum hvør inniheldur neyðugar hentleikar, innrættingar til felagslív og sum liggja væl í landslagnum, kann ein býlingur standa einsamallur. Nærumhvørvið, tún og felagsøkir hjá íbúgvunum í býlinginum eru liðuggjørd og tey hava fría atgongd til náttúru.

Byggibúning skal bert verða gjørd tá verkætlanin er búgvin og verður liðuggjørd. Hetta fyri at varveita sum mest av náttúruni órørda so leingi sum gjørligt.

So hvørt sum býlingarnir leggjast aftrat, tekur miðstaðurin skap og er fullfíggjaður tá allir 4 býlingarnir eru liðnir. Handlar og annað virksemið á torginum verður virkið so hvørt sum fleiri fólk leggjast aftrat í Stórutjørn.




## Byggistig 1

Koyrivegur frá verandi rundkoyring verður førdur fram til Býling 1. Lívdarheyggur móti útsynningi verður gjørdur og býlingurin verður gjørdur liðugur innanfyri lívdarheyggin við raðhúsum, sethúsum og




## Byggistig 2a + 2b

Eystanfyri á flata byggilendinum kann býlingurin byggjast í tveimum byggistigum um man vil, eftir sama leisti. Lívdarheyggur móti vegnum og hørðu ættunum, raðhúsini, sethúsini og býarhúsinum sum tað fyrsta.




## Byggistig 2c - byrjan til miðstað

Fyrsta torgskapið verður til, og bussteðgiplássið gjørt. Tá býlingar 1 og 2 eru gjørdir er væntandi grundarlag fyri eini byrjan til miðstað við smáhandli, kafé og aðrari fríari vinnu.





Útsýnið ímillum húsaraðiranr í býlingi 3 er einastandandi vakurt.




## Byggistig 3

Miðstaðarhúsið verður útbygt til at hýsa størri matvøruhandli, býlingur 3 verður gjørdur á kneysunum við útsýniskílunum móti havinum og Skálafjørðinum. Miðstaðurin verður lokaður norðanfyri við býarhúsinum til býling 3 við íbúðum og ovaru hæddunum og á veghædd við kaféum og aðrari fríari vinnu. Grøni geirin móti vestri verður gjørdur við ymsum innrættingum til útitilhald. Innrættingar við torgi og vatnhyli við útitilhaldi verða gjørdar.




## Byggistig 4

Býlingur 4 fullfíggjar torgið við sínum býarhúsi móti útnyrðingi. Grøni kílin móti vestri verður gjørdur. Sunnara býarbyggingin er nú liðug.




## Byggistig 5 a+b

Byggistig 5a +b
Nýggjur vegur frá Klingruni sunnanfyri kirkjugarðin verður gjørdur inn á økið til býling 5 a og b. Íbúðarlongdir verða bygdar á kantinum við útsýni yvir Sundalagið og Skálafjørð. Tilkoyring og parkering vendur móti norði, soleiðis at náttúruvøkru tilhaldsøkini móti vestri eru bilfrí. Møguligt er at byggja stovn eisini.




## Byggistig 6

Høvuðsvegurin verður liðugtgjørdur og íbundin koyrivegin til miðstaðin. Býlingur 6 við sethúsum verður gjørdur á slættanum ímillum býling 4 og 5b. Mælt verður til at byggja býling 6 seinast í røðini, so økið er tókt til møguliga útbygging av kirkjugarði, um tørvur verður til tess.

# TORG

Torgið í miðstaðnum verður ein savnandi kraftmiðdepil í Stórutjørn. Torgið er eitt alment torg sum allir borgarar hava atgongd til. Men, tað er sjálvsagt eisini ein natúrligur savningarstaður hjá øllum, sum búgva í teimum 6 býlingunum í Stórutjørn.
Á torginum steðgar bussurin, torgið liggur so mikið sentralt, at teir 4 býlingarnir, sum liggja runt um torgið, hava nøktandi frástøðu til eitt felags bussteðgipláss á torginum.
Á torginum verða innrættingar, sum geva pláss fyri savnan av nógvum fólkum. Virksemið, sum eru savnandi og viðkomandi hjá Stórutjarnaríbúgvum, so sum jólatræshald, marknaðardagar o.t.
Trø, runnar og blómur geva samstundis lívd til útilívs virksemi á torginum, so sum útiservering og marknaðartorg. Torgið skal verða virkið um veturin eins og um summarið. Um summarið er marknaðartorg og útitilhald um vatnhylin, har fólk kunnu sita og njóta ein ís í sólini. Um veturin verður ísbelegningur lagdur á torgið og vatnhylurin er frystur til. Tá ber til at sita og hugna sær við heitum koppi av kakao meðan børnini skoyta.
Í bygningunum runt um torgið eru kaféir, handlar, borgarahús og aðrar innrættingar, sum samvirka við lívinum á torginum.



jólatræshald



Grønur geiri





útiservering



handilstorg og skoytibani

býarbussur







## Torg sum knýtur saman býarpartar

Í heildarætlanini verður eitt miðstaðarøki, sum savnar allar býlingarnar við Stóru tjørn. Hvør býlingur hevur ein íbúðarbygning sum ber dám av einum býarhúsi og liggur í útjaðaranum á býlinginum, og er samstundis ein bygningur sum vendir sær móti miðstaðarøkinum. Tá allir býlingarnir eru útbygdir, er miðstaðarøkið samstundis útbygt.

Kring um torgið liggja handlar, kaféir og annað útatvent virksemi, sum fara at skapa lív á torginum. Á torginum kann eisini verða ymsikt virksemi, sum er viðkomandi fyri íbúgvar aðrastaðni í grannalagnum. Tað kann eisini verða marknaðardagar, sum savna fólk úr allari kommununi ella eitt felags tiltak fyri allar íbúgvarnar í Hoyvíkini.

Torgið við Stórutjørn og kirkjutorgið fyri endan á Karlamagnusarbreyt, verða tvey punktir fyri endan á einum miðstaðarstreingi, har miðstaðarstrongurin er Karlamagnusarbreyt. Torgið við Stórutjørn sum eisini hevur beinleiðis samband við grønu geirarnar, fer at savna fólk við ymiskum ørindum, og er við til at skapa meira og fjølbroyttari virksemi á mistaðarstreinginum millum torgini bæði.
Umráðandi er at skapa eitt gott og lætt samband millum torgið við Stórutjørn og Karlamagnusarbreyt.
Í heildarætlanini er brúgvasamband yvir Klingursvegin, har gangandi og súklandi ferðsla trygt kann ferðast millum Stórutjørn og Karlamagnusarbreyt.

Frástøðan millum kirkjutorgið og nýggja torgið við Stórutjørn verður umleið 1,2 km. Við eini gonguferð á 5 km/t fer tað at taka 15 min. at ganga frá torgið til torg



Slangubrúgvin í Keypmannahavn



# Torg støddir til samanberingar

Torgið við Stórutjørn verður 5.760 m2 til støddar.
Torgið er stórt og er ætlanin at torgið skal hava ein landslagsdám heldur enn ein býardám. Grønu geirarnir báðumegin bústaðar- og miðstaðarøki, stinga grønar rásir inn í miðstaðin og geva torginum ein landslagsdám.
Tó verða ymiskir aktivitetir, sum hoyra til á einum torgið, og sum geva torginum lív. Eitt nú økið til útitilhald, til marknaðartorg, skoytibreyt, útiseervering, spælipláss, busspláss og skýli.
Í bygningunum kring um torgið verða hølir á veghædd sum hýsa kaféum, matstovum, handlum og øðrum vinnurekandi sum fáa viðskiftafólk frá gøtuni, so sum hárfríðkanarfólk, fótterapeutar osfr.
Myndirnar niðanfyri vísa dømir um torg sum vit kenna og sum hava líknandi innrættingar. Við støddini á Stórutjørn torginum lagt omanyvir tey ymsu torgini, ber til at meta um støddina.




**Torg í miðstaðið í Stórutjørn**



**Vágsbotnur**



**Grasagarður**



**Biskupstorg**



**Svínaryggur**

Dagfest: 01.09.2023

Býarskipanardeildin